# Fylgiskjal 1:
# STØÐUMETING AV LANDSVEGAKERVINUM

**Innihaldsyvirlit:**

**1. Framkomuleiki ........................................ 2**
**2. Ferðslutrygd ........................................ 3**
**3. Ferðsluumhvørvi ........................................ 3**
**4. Kollektiv ferðsla ........................................ 3**
**5. Raðfestar ætlanir ........................................ 3**
**6. Støðan á vegakervinum ........................................ 4**
**7. Yvirlit yvir størri, raðfestar verkætlanir ........................................ 46**
**8. Yvirlit yvir smærri verkætlanir (til ferðslugransking) .......... 50**
**9. Kort, ið vísa trupul økir ........................................ 53**

Analysan av støðuni á vegunum kring landið er býtt upp soleiðis:

- Suðuroy
- Sandoy og Skúvoy
- Vágar og Mykines
- Streymoy, Nólsoy, Hestur og Koltur
- Eysturoy
- Norðoyggjar

Analysan er ein skipað gjøgnumgongd av økjunum, og úrslitini síggjast á viðløgdum talvum.

Analysan er gjørd á tann hátt, at fyrst verður greitt frá trupulleikum, og síðani verða nevnd uppskot til loysnir. Øll uppskotini til loysnir verða roynd í áðurnevnda modelli í 4 stigum. Trupulleikarnir eru býttir upp, sum nevnt niðanfyri:

**1. Framkomuleiki**

Frágreiðingin í teiginum um framkomuleika umfatar góðskuna av vegnum, kapasitet, støðuna av viðlíkahaldi og linjuføring.

Analysan umfatar m.a. landafrøðilig, staðfrøðilig og onnur aktuell viðurskifti, sum eru ein avgerandi partur í sambandi við trygd og effektivitet í ferðsluni.

**2. Ferðslutrygd**

Analysan byggir á ferðsluóhappini seinastu 5 árini, har frágreiðing er skrivað (2001 til og við 2005), og kannað verður, hvar óhappini henda og hvat skrásetta orsøkin er.

Orsøkin til óhappini kann býtast sundur í hesar bólkar

1. Seyður á vegnum
2. Ferð
3. Hálka
4. Rúsdrekkakoyring
5. Annað

**3. Ferðsluumhvørvi**

Íløguøkir í ferðsluumhvørvinum eru ofta økir, har forðingar eru staðfestar og m.a. tung ferðsla í sambandi við fólkaflutning.

Eitt fyribyrgjandi arbeiði er til gagns fyri nærumhvørvið og forðar fyri møguligum óhappum framyvir. Arbeiðsøkir av hesum slag eru m.a. skúlaøkir, har tað verða gjørdar analysur, sum vísa á ótryggar leiðir og vandamikil vegastrekki hjá børnum, foreldrum og lærarum.

Arbeiðið at betra um ferðsluumhvørvið kann á teimum kommunalu vegunum verða gjørt av avvarðandi kommunu, eins og Landsverk arbeiðir við at betra um landsvegirnar. Samstarv tvørtur um mørk er ein fyrimunur fyri allar partar.

**4. Kollektiv ferðsla**

Ferðsla við ferju og tyrlu er viðgjørd í kanningini.

**5. Raðfestar ætlanir**

Av listanum yvir allar ætlanir eru valdar nakrar størri og smærri ætlanir, sum verða mettar at hava størstan týdning fyri tey einstøku økini og alt landsvegakervið.

Tær stóru ætlanirnar eru savnaðar á einum lista og raðfestar nr. 1 og nr. 2 (kapittul 7). Kostnyttu rokning og greining av avleiðingunum verður síðani gjørd av hesum ætlanum (fylgiskjal 2).

Tær smærru ætlanirnar eru savnaðar á einum lista yvir ætlanir, sum skulu ferðslukannast (kapittul 8).

**6. Støðan á vegakervinum**

<table>
<tr><td colspan="2">Suðuroy</td></tr>
<tr><td>Framkomuleiki</td><td></td></tr>
<tr><td>Lýsing av trupulleikum</td><td>
1. Sandvík - Hvalba. Í støðum er vegurin sera brattur (upp til 140 ‰) og tunnilin, sum hevur eina ársmeðalferðslu uppá 215 bilar, er einsporaður og lýkur ikki nútíðar krøv um hædd og breidd, eins og hann ikki hevur ljós og trygdarútgerð.<br>
2. Hvalba – Nes. Vegurin er smalur og liggur lágt.<br>
3. Vegurin niðan til Hvalbiartunnilin hevur eina óregluliga linjuføring við vánaligum undirlagi í støðum. Vegurin liggur høgt.<br>
4. Hvalba – Tvøroyri. Hvalbiartunnilin er elsti tunnil í Føroyum, hann ein einsporaður, og uml. 646 bilar koyra gjøgnum tunnilin um døgnið. Tunnilin lýkur ikki krøvini til hædd og breidd, eins og tunnilin ikki hevur ljós og trygdarútgerð.<br>
5. Strekkið Hvalbiartunnilin – Tvøroyri hevði seinastu 5 árini í meðal 6 óhapp pr. ár.<br>
6. Tvøroyri. (Kommunalur vegur). Vegurin fer gjøgnum bygt øki, hann er smalur, og útsýnið er vánaligt.<br>
7. Tvøroyri – Froðba. Vegurin er eitt smalt, óregluligt strekki uttan vegakslar, ferðslan fer gjøgnum bygt øki, har tað eru avmarkaðir møguleikar at gera gongubreyt.<br>
8. Tvøroyri – Øravík. Vegastrekkið skal m.a. avgreiða ferðsluna til ferjuna, og gevur hetta til tíðir tætta ferðslu.<br>
9. Øravík – Fámjin er ein smalur vegur, sum liggur høgt og er sera brattur, har mangla vegakslar, og um veturin kunnu vera trupulleikar.<br>
10. Øravík – Hov. Tað eru fleiri stórir vegatekniskir trupulleikar á strekkinum; hetta verður bøtt um við nýggja
</td></tr>
</table>

| | |
|---|---|
| | Hovstunlinum, sum er í gerð.<br>11. Hov – Porkeri Á vegnum er eitt strekki, sum liggur høgt (160 m hædd), har kunnu vera trupulleikar av kava og ísi; har er eisini eitt sera bratt strekki, sum er 80 ‰.<br>12. Porkeri – Vágur. Vegurin manglar vegastokk í støðum, eins og tað er bygt fram við vegnum.<br>13. Vágur.(Kommunalur vegur). Á teimum heldur smølu vegunum er bæði hørð og bleyt ferðsla.<br>14. Lopra – Akrar. Vegurin er smalur, hevur ikki vegakslar, og í støðum er bygt fram við vegnum. Frá Lopra er uml. 1 km av vegnum umbygdur.<br>15. Lopra – Sumba. Sumbiartunnilin er góður, men har mangla ljós og trygdarútgerð. Í sunnara enda á tunlinum eru trupulleikar av seyði.<br>16. Lopra – Sumba. Tann gamli vegurin manglar viðlíkahald.<br>17. Ein vanligur trupulleiki er, at seyður gongur á vegnum.<br>18. Tað finnast strekki, har vegastokkur manglar. |
| Uppskot til loysnir | 1. Sandvík – Hvalba. Tunnilin verður dagførdur við ljósi og trygdarútgerð.<br>2. Hvalba – Nes. Vegurin verður dagførdur og neyðugar ábøtur gjørdar..<br>3. Vegurin niðan til Hvalbiartunnilin. Vegurin verður dagførdur. Manglar verða tiknir við í útrokningarnar til gerð av nýggjum tunli.<br>4. Hvalba – Tvøroyri. Tunnilin verður dagførdur, ella nýggjur tunnil prosjekteraður.**(Tekna og útrokna prosjekt)**.<br>5. Strekkið Hvalbiartunnilin – Tvøroyri hevur eitt javnt stórt tal av óhappum, í meðal 6 um árið seinastu 5 árini; umhugsað verður at hegna fyri seyði. Vegurin kann verða lagdur uttan um bygt øki. Er kortini ikki verri enn aðrastaðni.<br>6. Tvøroyri. (Kommunalur vegur). Vegakervið verður dagført, vegakslar og súkklu- og gongubreyt verða tikin við í metingina at betra um ferðsluviðurskiftini. **(Ferðslukannast)**.<br>7. Tvøroyri – Froðba. Vegurin verður rættaður upp og dagførdur við vegakslum/gongubreyt, har tað ber til.<br>8. Tvøroyri – Øravík. Vegastrekkið verður útbygt við breytum til bleytu ferðsluna, og plaseringin av býarskeltinum skal endurskoðast. **(Ferðslukannast) (Tekna og útrokna prosjekt)** |

| | |
|---|---|
| | 9. Øravík – Fámjin. Á ovasta strekkinum, uml. 2 km, kann við fyrimuni gerast ein tunnil uppá 6-800 m, sum vil bøta um størstu trupulleikarnar á strekkinum. Allur vegurin treingir til dagføring. **(Tekna prosjekt).**<br>10. Øravik – Hov. Á strekkinum eru nakrir stórir vegatekniskir trupulleikar, sum bøtt verður um við nýggja Hovstunlinum, sum er í gerð, og sum verður tikin í brúk medio 2007.<br>11. Hov – Porkeri. Har vegurin liggur høgt, eru trupulleikar við kava og hálku. Verður skrásett og kannað í sambandi við møguliga uppseting av kavahegni.<br>12. Porkeri – Vágur. Vegastokkur verður settur upp, har tað er neyðugt. Ferðslutryggar loysnir verða kannaðar í sambandi við útkoyring frá bygdum økið fram við vegnum. **(Ferðslukannast)**.<br>13. Vágur. (Kommunalur vegur). Vegakervið verður dagført, vegakslar og súkklu- og gongubreyt verða tikin við í metingina at betra um ferðsluviðurskiftini. **(Ferðslukannast)**.<br>14. Lopra – Akrar. Arbeiðið at dagføra vegin heldur fram.<br>15. Lopra – Sumba. Tunnilin verður dagførdur við ljósi, trygdarútgerð og rulluportri við sunnara endan á tunlinum.<br>16. Lopra – Sumba. Tann gamli vegurin er ein klassa 4 vegur, og hann er tískil ikki partur av tí yvirskipaða vegakervinum. Vegurin er at meta sum ein ferðafólkavegur. Vegurin verður dagførdur við viðlíkahaldi. |
| **Kollektiv ferðsla** | |
| Lýsing av trupulleika | Túratal. Smyril siglir 2 ferðir dagliga av Drelnesi til Tórshavn, og ynskið er at økja um túratalið. |
| Uppskot til loysn | At flyta ferjuhavnina frá Tórshavn til Sands (eftir at undirsjóvartunnilin er komin) fer at gera tað møguligt at økja um túratalið. |

| Ferðslutrygd | |
|---|---|
| Lýsing av trupulleikum | Fólkaskaðar:<br>Tað eru staðfest 11 ferðsluóhapp við fólkaskaða síðani ár 2000. Eitt óhapp orsakað av hálku, 2 orsakað av seyði og 3 orsakað av rúsdrekkakoyring. Á vegnum millum Vág og Lopra er eitt ferðsluóhapp hent orsakað av gróti á vegnum (omanlopi). Hini eru helst ikki hend orsakað av vegatekniskum orsøkum.<br>Materiellir skaðar:<br>Tað eru staðfestir fleiri materiellir skaðar í Suðuroynni; flestu ferðsluóhappini henda við Hovsegg, á Hovsvegnum (svinginum v/Hovsá), í Øravík, í Øravíkarlíð, frá Trongisvági til Hvalbiartunnilin og í Hvalbiartunlinum. |
| Uppskot til loysnir | 1. Í sambandi við Hovstunnilin verður vegurin millum Øravík og Hov broyttur, so hann verður dagførdur sambært nútíðar krøvum.<br>2. Hovsegg verður ein klassa 4 vegur, tvs. hann verður ikki partur av tí yvirskipaða vegakervinum, eftir at Hovstunnilin er tikin í brúk.<br>3. Í Øravíkarlíð henda lutfalsliga nógv ferðsluóhapp, og henda tey av ymiskum orsøkum. **(Ferðslukannast)**.<br>4. Gjøgnum Trongisvág og niðan til Hvalbiartunnilin henda lutfalsliga nógv ferðsluóhapp, og fleiri av teimum henda orsakað av seyði. Vegurin verður dagførdur og møguliga breiðkaður. Í samráð við bóndan verður hegn møguliga sett upp. Í sambandi við ein møguliga nýggjan Hvalbiartunnil kann vegurin, ella ein partur av vegnum, gerast ”óneyðugur”, um linjuføringin verður broytt. **(Ferðslukannast)**.<br>Hvalbiartunnilin verður dagførdur og breiðkaður, ella verður gjørdur ein nýggjur Hvalbiartunnil, sum greitt frá undir ”Framkomuleiki”. Um ferjusambandið verður flutt til eina havn í Hvalba, gerst tunnilin ein partur av høvuðsvegakervinum. |

| **Ferðsluumhvørvi** | |
|---|---|
| Lýsing av trupulleika | Í nøkrum bygdum eru trupulleikar við gjøgnumgangandi ferðslu, men ferðslumongdin ger, at talan kortini ikki er um eina forðing. |
| Uppskot til loysn | Trupulleikarnir kunnu loysast á tann hátt, at gjøgnumgangandi ferðsla og lokal ferðsla verða skild sundur. |
| **Raðfestar ætlanir** | |
| Lýsing av ætlanum | Hvalbiartunnilin. Niðan fyri nevndu møguleikar verða umhugsaðir:<br>1. Núverandi tunnil verður víðkaður (hædd og breidd) og verður dagførdur við m.a neyðugari trygdarútgerð.<br>2. Nýggjur tunnil við nýggjari linjuføring verður gjørdur.<br>Tvøroyri – Øravík. Strekkið verður útbygt við breytum til bleytu ferðsluna frá ferjuni, og plaseringin av býarskeltinum verður endurskoðað. Gongubreyt manglar um Heygar, uml. 700 m.<br>Øravík – Fámjin. Ovasta strekkið, uml. 2 km, verður lagt um til ein tunnil uppá 6-800 m, sum fer at bøta um teir størstu trupulleikarnar á strekkinum. Allur vegurin verður dagførdur.<br>Sumbiartunnilin og Sandvíkartunnilin verða dagførdir við ljósi og trygdarútgerð.<br>Porkeri – Vágur. Autoverja verður sett upp á týðandi støðum. Ferðslutryggar loysnir verða kannaðar í sambandi við útkoyring frá bygdum økið fram við vegnum.<br>Sandvíkartunnilin verður víðkaður ella nýggjur tunnil verður gjørdur. |
| **Farmtíðarmøguleikar** | |
| Lýsing | - Nýggj ferjuhavn í Hvalba, haðani siglt verður til Sands; hetta er av serligum týdningi, um undirsjóvartunnil verður gjørdur til Sandoynna.<br>- Undirsjóvartunnil úr Suðuroynni til Sandoynna<br>- Flogvøllur til innanoyggja flúgving |

# Sandoy

| **Framkomuleiki** | |
|---|---|
| Lýsing av trupulleikum | 1. Vegurin frá Skopun til Sands er brattur, (>70‰) nær Skopun, og liggur fyri ein part høgt.<br>2. Vegurin gjøgnum Sandarlíð er í støðum sera smalur, og grótlaðingar treingja til ábøtur; tað kemur fyri, at grótlop endar á vegnum.<br>4. Á vegnum til Dals eru trupulleikar av grótlopi, og í støðum eisini skalvalopi.<br>5. Vegurin til Húsavíkar og Skálavíkar manglar dagføring.<br>6. Vegurin til Skarvanesar manglar dagføring, eins og lættari viðlíkahald. Harafturat eru skalva- og omanlop í støðum.<br>7. Vegakslar mangla á øllum vegastrekkinum av Sandi og til Skálavíkar, Húsavíkar, Dals og Skarvanes. |
| Uppskot til loysnir | Ad.1. Vegurin verður tikin við í metingina, tá ið fast samband skal prosjekterast millum Sandoynna og Streymoynna.<br>Ad.2. **(Tekna og útrokna prosjekt)** Trupulleikarnir í Sandarlíð kunnu loysast soleiðis:<br>a) Umbyggja verandi veg<br>b) Gera ein nýggjan, breiðari veg við fjallatrygging<br>c) Gera ein veg, sum á tí ovasta strekkinum verður kombineraður við einum tunli.<br>d) Gera ein tunnil, sum fevnir um næstan alt strekkið.<br>Ad.2+4. Skráseta strekki, har omanlop henda, so trupulleikar kunnu staðfestast.<br>Ad.4. **(Eftirmeta og útrokna prosjekt)** Trupulleikarnir á Dalsvegnum kunnu loysast soleiðis:<br>a) Gera ábøtur á vegin, m.a. møtipláss og fjallatrygging.<br>b) Gera tunnil frá Húsavík til Dals.<br>Ad.5. Dagføra vegin til Húsavíkar og Skálavíkar.<br>Ad.6. Á vegnum til Skarvanes verða gjørdar minni dagføringar, lættari viðlíkahald og skráseting av omanlopum. |

| | |
|---|---|
| **Ferðsla við ferju og tyrlu** | |
| Lýsing av trupulleika | Í Skopun og við ferjuleguna á Sandi mangla skýli til ferðafólk. Á Sandi mangla eisini skipaði parkeringspláss. |
| Uppskot til loysn | Skýli verða sett upp í Skopun og á Sandi. |
| **Ferðslutrygd** | |
| Lýsing av trupulleikum | <u>Fólkaskaðar:</u><br>Tað eru staðfest 5 ferðsluóhapp við fólkaskaða síðani ár 2001.<br>1. Ein fólkaskaði hendi orsakað av seyði, og ein møguliga orsakað av, at vegur smalkar.<br>2. Á Skálavíkarvegnum eru skrásett 2 ferðsluóhapp orsakað av rúsdrekkakoyring.<br>3. Við Meginskúlan á Sandi er skrássett eitt ferðsluóhapp, sum møgiliga hendi orsakað av ov nógvari ferð. **(Ferðslukannast)**<br><u>Materiellir skaðar:</u><br>Fleiri materiellir skaðar eru staðfestir á Sandoynni. Flestu ferðsluóhappini henda á strekkinum millum Skopun og Meginskúlan. **(Ferðslukannast)** |
| Uppskot til loysnir | 1. Verður vegurin millum Skopun og Sand ein høvuðsvegur, so fer ikki seyður at koma á vegin (sí stk. um høvuðsvegir).<br>2. Vegakervið verður dagført, sum greitt frá í sambandi við framkomuleika.<br>3. Íbindingin við Meginskúlan verður ferðslukannað. Ein møgulig loysn er at seta upp fastar ferðgáar. |
| **Ferðsluumhvørvi** | |
| Lýsing av trupulleikum | Eingir trupulleikar skrásettir |
| Uppskot til loysn | |
| **Framtíðarmøguleikar** | |

| | |
|---|---|
| Lýsing | - Flogvøllur í Søltuvík<br>- Undirsjóvartunnil millum Streymoynna og Sandoynna (møguliga upp í Hesti). **(Tekna og útrokna prosjekt)**<br>- Nýggjur vegur frá undirsjóvartunlinum til flogvøllin í Søltuvík, íroknað ein ringveg uttan um Sands bygd, so ferðslan ikki fer gjøgnum bygt øki. Vegurin skal hava íbinding til ferjuhavnina á Sandi til ferðsluna til Suðuroyar.<br>- Ferjuhavnin á Sandi út-/umbyggjast til at tæna sjóvegis ferðsluni til Suðuroyar. |
| | |

# Skúvoy

| | |
|---|---|
| **Framkomuleiki** | |
| Lýsing av trupulleika | |
| Uppskot til loysn | |
| **Ferðsla við ferju og tyrlu** | |
| Lýsing av trupulleikum | 1. Ferjan er ikki tíðarhóskandi.<br>2. Á kaiini er einki skýli til ferðafólk.<br>3. Bygdarfólkið ynskir økt túratal, bæði við ferjuni og tyrluni. |
| Uppskot til loysnir | Ad.1. Ferjan verður skift út við aðra tíðarhóskandi ferju, sum er egnað til fólk við breki, og havnirnar í Skúvoy og á Sandi verða umbygdar samsvarandi. Val av ferju kann vera avgerandi fyri búsetingina í Skúvoy.<br>Ad.2. Skýli til ferðafólk verður sett upp á kaiini.<br>Ad.3. Málið um túratalið verður tikið upp fyri seg. |
| **Ferðslutrygd** | |
| Lýsing av trupulleika | Ferðsluóhapp eru ikki skrásett |
| Uppskot til loysn | |
| **Ferðsluumhvørvi** | |
| Lýsing av trupulleika | Eingir trupulleikar eru skrásettir. |
| Uppskot til loysn | |

# Stóra Dímun

| | |
|---|---|
| **Framkomuleiki** | |
| Lýsing av trupulleika | |
| Uppskot til loysn | |
| **Ferðsla við ferju og tyrlu** | |
| Lýsing av trupulleika | Umstøðurnar við tyrlupallin gera, at til ber ikki at flúgva í myrkri. |
| Uppskot til loysn | Ljós verða sett upp við tyrlupallin, so tyrlan kann lenda í myrkri. |
| **Ferðslutrygd** | |
| Lýsing av trupulleika | |
| Uppskot til loysn | |
| **Ferðsluumhvørvi** | |
| Lýsing av trupulleika | |
| Uppskot til loysn | |

# Hestur

| | |
|---|---|
| **Framkomuleiki** | |
| Lýsing av trupulleika | |
| Uppskot til loysn | |
| **Ferðsla við ferju og tyrlu** | |
| Lýsing av trupulleikum | 1. Á kaiini er einki skýli til ferðafólk.<br>2. Tyrluflúgving er ikki út í Hest. |
| Uppskot til loysnir | Ad.1. Skýli til ferðafólk verður sett upp á kaiini.<br>Ad.2. Tyrlupallur eigur at gerast í sambandi við sjúkraflutning. |
| **Ferðslutrygd** | |
| Lýsing av trupulleika | Ferðsluóhapp eru ikki skrásett. |
| Uppskot til loysn | |
| **Ferðsluumhvørvi** | |
| Lýsing av trupulleika | Eingir trupulleikar eru skrásettir. |
| Uppskot til loysn | |
| **Framtíðarmøguleikar** | |
| | Fast samband kann gerast út í Hest frá Sandoyartunlinum |
| | |

# Koltur

| | |
|---|---|
| **Framkomuleiki** | |
| Lýsing av trupulleika | |
| Uppskot til loysn | |
| **Ferðsla við ferju og tyrlu** | |
| Lýsing av trupulleika | Umstøðurnar við tyrlupallin gera, at til ber ikki at flúgva í myrkri. |
| Uppskot til loysn | Ljós verða sett upp við tyrlupallin, so tyrlan kann lenda í myrkri. |
| **Ferðslutrygd** | |
| Lýsing av trupulleika | |
| Uppskot til loysn | |
| **Ferðsluumhvørvi** | |
| Lýsing av trupulleika | |
| **Framtíðarmøguleikar** | |
| | Ferjuflutningur kann verða úr í Koltur, um nýggj ferja verður fingin til vegar á Hestleiðini. |

# Streymoy

| Framkomuleiki | |
|---|---|
| Lýsing av trupulleikum | 1. Vegurin Tjørnuvík – Haldarsvík er smalur, í støðum er vandi fyri omanlopi ella skalvalopi. Í fleiri støðum mangla vegakslar. Vegaføringin er óreglulig, og vegurin niðan frá Tjørnuvík er brattur.<br>2. Vegurin Haldarsvík – Langasandur – Nesvík – Brúgvin um Streymin er smalur, og í fleiri støðum mangla vegakslar. Á einstøkum støðum er vandi fyri omanlopi. Tung og bleyt ferðsla eru samanblandað í bygdum øki.<br>3. Brúgvin um Streymin. Brúgvin er neyðug í sambandi við eystur-/vesturgangandi ferðsluna. Viðlíkahald manglar.<br>4. Vegurin brúgvin um Streymin – Streymnes – Hvalvík – Áir – Hósvík. Seyður gongur á vegnum, serliga nær bygdum øki. Fleiri truplar vegíbindingar eru á strekkinum.<br>5. Saksun – Hvalvík. Vegurin er óregluligur og smalur, í fleiri støðum mangla vegakslar, og í Hvalvík fer ferðslan gjøgnum bygt øki.<br>6. Hósvík – Kollafjørður. Á strekkinum henda fleiri óhapp (sí ”ferðslutrygd”), og kríatúr ganga á vegnum. Frá Langasandi í Kollafirði og til rundkoyringina er ein samanblandingur av bleytari og harðari ferðslu. Fleiri truplar vegíbindingar eru á strekkinum.<br>7. Signabøur. Vegurin til bygdina er smalur, óregluligur og vegakslar mangla. Samanblandingur er av harðari og bleytari ferðslu, og kann hetta hava við sær trupulleikar, tá nýggja havnin á Signabø er gjørd.<br>8. Kollafjørður – Leynar. Vegastrekkið hevur ikki teir stóru framkomutrupulleikarnar, men har henda nógv ferðsluóhapp (sí ”ferðslutrygd”), og seyður gongur á vegnum. Vegakslarnar treingja til ábøtur.<br>9. Vestmanna – Leynar. Vegurin, sum er einasta leið til Vestmanna, liggur høgt, og niðan frá Vestmanna er vegurin sera brattur. Trupulleikar eru við kava og ísi, eins og kríatúr ganga á vegnum. Í Vestmanna er ein samablandingur av bleytari og harðari ferðslu í bygdum øki.<br>10. Leynar – Skælingur. Vegurin er smalur og í støðum mangla vegakslar. Vegurin er óregluligur, og |

| | |
|---|---|
| | skalvalop og omanlop kunnu koma fyri.<br>11. Leynatunnilin treingir til dagføring, m.a. ljós og trygdarútgerð. Trupulleikar eru við kríatúrum í tunlinum.<br>12. Kollfjarðartunnilin treingir til dagføring, m.a. viðvíkjandi trygdarútgerð.<br>13. Vegamótið í Kaldbaksbotni er eitt trupult vegamót.<br>14. Kaldbaksbotnur – Kaldbak. Ferðslutrupulleikar eru ikki á strekkinum. Vegurin er smalur og liggur lágt, og talan kann gerast um at byrgja fyri burturmáan. Í Kaldbak er ein samanblandingur av bleytari og harðari ferðslu. Strekkið frá bygdarvegnum á Fløtum og til Kaldbaks treingir til ábøtur.<br>15. Kollafjarðartunnilin til rundkoyringina í Hoyvík. Á strekkinum henda sera nógv ferðsluóhapp (sí ”ferðslutrygd”), og seyður gongur á vegnum, serliga millum Sund og Hvítanes. Frá Hvítanesi og til rundkoyringina hevur innkomuvegurin bleyta og harða ferðslu í sama vegaprofili.<br>16. Vegmótið við Hvítanes er ein trupulleiki, serliga í meldurtíðini.<br>17. Vegamótið á Sandvíkarhjalla. Útsýnið er sera vánaligt.<br>18. Íbindingin við Mannbrekku. Útkoyringar frá bústaðum við vegamótið geva trupulleikar<br>19. Íbindingin oman til Studentaskúlan í Hoydølum er ein trupulleiki.<br>20. Vegamótið við Ringvegin er ein trupulleiki, serliga í meldurtíðini.<br>21. Oyggjavegurin liggur høgt, vegurin er brattur í støðum, og trupulleikar eru við kava og ísi.<br>22. Norðadalur. Vegurin einsporaður og smalur, liggur høgt og gjøgnum óslætt lendi. Vegurin er sera brattur.<br>23. Tórshavn – Velbastað. Vegurin liggur rímiliga høgt, og nógv kríatúr ganga á vegnum.<br>24. Vegamótið við Norðasta Horn er trupult.<br>25. Velbastað – Kirkjubøur. Vegurin er smalur, og í fleiri støðum mangla vegakslar.<br>26. Velbastað – Syðradalur. Vegurin er smalur og liggur gjøgnum lendi, har tað er illa framkomandi, og har vandi er fyri skalvalopum. |
| Uppskot til loysnir | 1) Tjørnuvík – Haldarsvík. Vegurin verður breiðkaður við vegakslum, har tað ber til. Omanlop og skalvalop verða skrásett út frá GPS-mátingum. Í støðum verður fjallatryggjað. **Tunnil á einum strekki millum Tjørnuvík og Haldarsvík verður teknaður og útroknaður.**<br>2) Haldarsvík – Langasandur – Nesvík – Brúgvin um Streymin. Vegurin verður breiðkaður við vegakslum, har tað ber til. Brúgvin um Fossá verður breiðka og umvæld. Bleyta ferðslan verður raðfest hægri við at gera tiltøk |

| | |
|---|---|
| | á vegin gjøgnum bygdina.<br>3) Brúgvin um Streymin. Brúgvin skal kannast fyri manglar, ein viðlíkahaldsætlan skal gerast, og brúgvin skal dagførast.<br>4) Vegurin Brúgvin um Streymin – Streymnes – Hvalvík – Áir – Hósvík. Vegurin skal ferðslukannast í sambandi við vegamót og ferðsluóhapp á strekkinum. **(Tekna og útrokna prosjekt).**<br>5) Saksun – Hvalvík. Gera vegakslar, har tað ber til, og gera víkipláss til turistbussar.<br>6) Hósvík – Kollafjørður. Vegurin skal ferðslukannast í sambandi við vegíbindingar og ferðsluóhapp á strekkinum. **(Tekna og útrokna prosjekt).** Í sambandi við staðfesting av høvuðsvegi, verður hegnað fram við strekkinum, so seyður ikki kemur út á vegin. Samanblandingurin av bleytari og harðari ferðslu við Langasand í Kollafirði kann loysast við at **(tekna og útrokna prosjekt)**:<br>a) Bleyta ferðslan fær eina gøtuskipan, sum er atskild frá tungari ferðslu (her verður so kortini ferðsla í bygdum øki).<br>b) Ringvegur verður gjørdur inni í Firði Kollafirði.<br>c) Tunnil verður gjørdur úr Hósvík til Kollfjarðardal. Tunnilin leiðir tungu ferðsluna uttan um bygt øki í Kollafirði og er til fyrimuns fyri koyringina eystur-/vestureftir, eins og ferðsluna til bingju- og uppskipingarstøð báðu megin Kollafjørð.<br>7) Signabøur. Vegurin til bygdina verður í samband við vaksandi ferðsluna á økinum dagførdur tilsvarandi. Kollafjørður – Leynar. Í sambandi við staðfesting av høvuðsvegakervi verður hegnað fram við vegnum, so Frá at vera ein lítil bygd, er Signabøur nú ein bingjuhavn í Tórshavnar kommunu, og vegurin má dagførast tilsvarandi. Í sambandi við útbygging av ferðslukervinum, so skal bleyta ferðslan takast við í ætlanirnar. seyður ikki kemur út á vegin. Vegakslar verða dagførdar, har tað er neyðugt. Gamli vegurin fram við Leynavatni skal viðlíkahaldast og brúkast, tá ið Leynatunnilin er stongdur.<br>8) Vestmanna – Leynar. Vegurin verður dagførdur, og í Vestmanna og Leynum verður vegurin ferðslusaneraður fyri at skilja bleyta og harða ferðslu. Verandi vegur til Vestmanna verður raðfestur hægri í sambandi við kavarudding. Aðrar leiðir við tunli til Vestmanna verða kannaðar.<br>a) Tunnil frá Leynum til Vestmanna.<br>b) Tunnil frá Kvívík til Vestmanna ella til Gassádal (styttir um leiðina til Vestmanna).<br>c) Tunnil frá Hvalvík til Vestmanna. |

d) Vegur úr Kollfjarðadali framvið Leynavatni norðeftir og tunnil til dalin omanfyri Vestmanna.

9) Leynar – Skælingur. Vegurin verður dagførdur við vegakslum og vegastokki, har tað ber til. Skalvalop og omanlop verða skrásett í sambandi við møguliga uppseting av kavahegni og fjallatrygging.

10) Leynatunnilin verður dagførdur við ljósi og trygdarútgerð (Prosjekt er tøkt).

11) Kollfjarðartunnilin verður dagførdur við trygdarútgerð (Prosjekt er tøkt).

12) Vegamótið í Kaldbaksbotni verður endurskoðað; ein frákoyringarbreyt kann gerast til ferðsluna til Kaldbaks. **(Ferðslukannast)**.

13) Kaldbaksbotnur – Kaldbak. Vegurin verður viðlíkahildin, hann er partvís dagførdur, og kannast skal, um byrgjast skal fyri burturmáan.

14) Kollafjarðartunnilin til rundkoyringina í Hoyvík. Vegurin verður kannaður í sambandi við dagføring av vegageometriini; skal møguliga útbyggjast. Íbindingarnar skulu endurskoðast (er viðgjørt fyri seg), og gjørt verður eitt uppskot til loysn í sambandi við íbinding í ringvegin.

15) Vegamótið á Hvítanesi verður endurskoðað, møguleikarnir at gera eina frákoyringarbreyt verða kannaðir. Innkomuvegurin verður gjøgnumgingin í sambandi við ferðslusanering **(Ferðslukannast)**.

16) Íbindingin á Sandvíkarhjalla verður kannað í sambandi við frákoyringarbreyt frá høvuðsvegnum **(Ferðslukannast)**.

17) Íbindingin við Mannbrekku. Loysnin at gera eina rundkoyring er nevnd; ein annar valmøguleiki er at steingja vegin fyri gjøgnumgangandi ferðslu. **(Ferðslukannast)**.

18) Vegamótið oman til Studentaskúlan í Hoydølum má loysast. **(Ferðslukannast).**

19) Íbinding í Ringvegin við Hoydalar. Uppskot til loysn verður gjørt. **(Ferðslukannast)**

20) Oyggjavegurin verður dagførdur við vanligum viðlíkahaldi.

21) Norðadalur. Vegurin verður viðlíkahildin og dagførdur við vegakslum, har tað ber til. Annars ber til at kanna, um tað ber til:

   a) at gera tunnil frá Kalbaksbotni til Norðradals
   b) at gera tunnil frá Syðradali til Norðradals
   c) at gera veg frá Syrðadali til Norðradals

26) Tórshavn – Velbastað. Vegurin verður ein partur av høvuðsvegakervinum og verður í tí sambandi hegnað fram við vegnum.

| | |
|---|---|
| | 27) Íbindingin við Norðasta Horn verður ferðslukannað.<br>28) Velbastaður – Kirjubøur. Vegurin verður dagførdur, og vegakslar verða gjørdar, har tað ber til.<br>29) Velbastaður – Syðradalur. Vegurin verður dagførdur við viðlíkahaldi, vegakslum og vegastokki, har tað ber til. Í sambandi við møguliga fjallatrygging verður kannað, um grót kemur á vegin. |
| **Ferðslutrygd** | |
| Lýsing av trupuleikum | Fólkaskaðar:<br>Skrásett eru 104 ferðsluóhapp við fólkaskaða á landsvegunum á Streymoy síðani ár 2000, av hesum doyðu 7.<br>Materiellir skaðar:<br>Staðfest eru 846 óhapp íalt síðani 2000. Flestu ferðsluóhappini henda:<br>- Á vegateininum frá Brúnni um Streymin til rundkoyringina í Kollafirði, tey flestu áv hesum óhappum eru í Streymnesi-Hvalvík, í Hósvík og ígjøgnum Kollafjørð.<br>- Á vegateininum frá Kaldbaksbotni til Tórshavnar, flestu óhappini eru við Sund, Hvítanes og Hoyvík.<br>- Harafturat eru nøkur óhapp á Vestmannavegnum, í Kvívík, á Stykkinum og í Leynum.<br>Samanumtikið kann sigast, at flestu óhappini henda har mesta ferðslan er. |
| Uppskot til loysn | Allur vegateinurin frá Brúnni um Streymin til rundkoyringina í Kollafirði og víðari til Tórshavnar verður ferðslugranskaður. Kannað verður nærri, hvar og hví óhapp henda. Hóskandi tiltøk verða síðani framd. |
| **Ferðsluumhvørvi** | |
| Lýsing av trupulleikum | 1. **Inni í Firði í Kollafirði** er ein fløskuhálsur; øll ferðsla í og úr Norðoyggjum, Eysturoynni og einum parti av Streymoynni fer gjøgnum bygt øki. Hetta elvur til eina forðing í bygdini. Ársmeðalferðslan er uml. 4700 akfør gjøgnum bygt øki.<br>2. **Kollafjørður og Signabøur.** Økið er í ferð við at gerast eitt sera virkið bingju- og uppskipingarøki. Økið fer komandi árini at verða merkt av nógvari, tungari ferðslu.<br>3. **Ferðslan uttan um og í Tórshavn** er tann mesta og tættasta í landinum. Ferðslan fer framhaldandi at økjast saman við íbúgvaratalinum, pendlaramynstrinum, atkomumøguleikum og miðsavnan. |
| Uppskot til loysnir | 1. **Inni í Firði í Kollafirði**. Gjøgnumgangandi ferðslan verður løgd uttan um bygt øki við at gera ein ringveg |

| | |
|---|---|
| | ella tunnil, sum lýst undir ”framkomuleiki”.<br>2. **Kollafjørður og Signabøur**. Gerð av umkoyringarvegi inni í Firði í Kollafirði (ella tunli frá Hósvík til Kollafjarðar) fer at bøta um trupulleikan, men tunga ferðslan til havnina má leggjast til rættis, so hon er til minst møguligan ampa.<br>3. **Ferðslan uttan um Tórshavn.** Ferðslukervið uttan um innkomuvegirnar til býin má útbyggjast, so tað kann taka ferðsluna, tá hon er tann mesta (hátyngdina). |
| **Prosjekt til raðfestingar** | |
| | Tjørnuvík – Haldarsvík.<br>Hesir møguleikar verða umhugsaðir:<br>a) Fjallatrygging verður sett upp á ávísum støðum, og vegurin verður dagførdur.<br>b) Tunnil verður gjørdur á tí trupla partinum á strekkinum. |
| | Kollafjørður.<br>a) Ringvegur verður gjørdur inni í Firði í Kollafirði ella<br>b) tunnil verður gjørdur frá Hósvík til Kollfjarðardal ella<br>c) tunnil verður gjørdur frá Hvalvík til Kollfjarðardal. |
| | Vegamótið í Kaldbaksbotni verður endurskoðað; ein frákoyringarbreyt kann gerast til ferðsluna til Kaldbaks. **(Ferðslukannast)**. |
| | Vestmanna.<br>a) Vegurin til Vestmanna verður dagførdur<br>b) Tunnil verður gjørdur frá Leynum til Vestmanna<br>c) Tunnil frá Kvívík til Vestmanna<br>d) Tunnil frá Vestmanna til Leynavatn **(Tekna og útrokna prosjekt).** |
| | Vegurin Brúgvin um Streymin – Kollafjørður. Vegurin verður ferðslukannaður í sambandi við íbindingar og ferðsluóhapp. **(Ferðslukannast)**. |
| | Hvítanes. Møguleikarnir at gera eina frákoyringarbreyt verða kannaðir. Innkomuvegurin verður kannaður í sambandi við ferðslusanering. **(Ferðslukannast)**. |

| | |
|---|---|
| | Íbindingin á Sandvíkarhjalla verður kannað í sambandi við gerð av eini frákoyringarbreyt á høvuðsvegnum. **(Ferðslukannast)**. |
| | Mannbrekka. Loysnin at gera eina rundkoyring er nevnd. Ein annar valmøguleiki er at steingja Mannbrekku fyri gjøgnumgangandi ferðslu. **(Ferðslukannast)**. |
| **Framtíðarmøguleikar** | |
| | At útbyggja ringvegin uttan um Tórshavn fer at hava við sær eina íbinding til Argir við eini víðari leið til Glyvurnes - eitt nýtt bústaðarøki ella eitt øki til ein møguligan nýggjan flogvøll.<br><br>Nýggjur ella útbygdur tyrlupallur í Tórshavn |

# Nólsoy

| | |
|---|---|
| **Framkomuleiki** | |
| Lýsing av trupulleika | |
| Uppskot til loysn | |
| **Ferðsla við ferju og tyrlu** | |
| Lýsing av trupulleikum | 1. Ferjan er ikki tíðarhóskandi<br>2. Hvørki í Tórshavn ella í Nólsoy er skýli til ferðafólkini<br>3. Íbúgvarnir í Nólsoy ynskja økt túratal<br>4. Tyrlupallur til neyðflutning |
| Uppskot til loysnir | Ad.1.Ferjan verður skift út við eina nútímans ferju, sum er egnað til fólk við breki. Havnirnar í Nólsoy og í Tórshavn verða umbygdar samsvarandi.<br>Ad.2. Skýli til ferðafólk verða sett upp í havnunum í Nólsoy og í Tórshavn.<br>Ad.3. Túratalið verður viðgjørt fyri seg.<br>Ad.4. Ein tyrlupallur verður gjørdur til neyðflutning. |
| **Ferðslutrygd** | |
| Lýsing av trupulleika | |
| Uppskot til loysn | |
| **Ferðsluumhvørvi** | |
| Lýsing av trupulleika | |
| Uppskot til loysn | |

# Vágar

| Framkomuleiki | |
|---|---|
| Lýsing av trupulleikum | 1. Frá íbindingini við Fútaklett og niðan á Háls er vegurin brattur; trupulleikar eru við kava og hálku, og vegakslar og vegastokkur mangla. Íbindingin sjálv er trupul og kann elva til ferðsluóhapp.<br>2. Viðlíkahald manglar á Oyrargjáarvegnum.<br>3. Í Sørvági gongur ferðslan gjøgnum bygt øki, og har er ein samanblandingur av bleytari og harðari ferðslu.<br>4. Frá Leitisvatni til Miðvágs er seyður á vegnum, og vegastokkur manglar.<br>5. Gásadalstunnilin er einsporaður, men er ikki ein trupulleiki, tí har er so lítil ferðsla.<br>6. Gjøgnum Sandavág og Miðvág er er gjøgnumgangandi ferðsla í bygdum øki; hetta elvir til trupulleikar, tí bleyta og harða ferðslan blandast.<br>7. Sandavágur, Vatnsoyrar og Sørvágur hava trupul vegamót.<br>8. Trupulleikar eru á vegateininum við skúlan á Giljanesi. |
| Uppskot til loysnir | **Ad.1**. At gera krúpispor til tungu ferðsluna og dagføra vegamótið bøtir um trupulleikan. Ein annar møguleiki er at gera tunnil frá Vágatunlinum til Sandavágs**.** Vegastokkur skal setast upp. **(Ferðslukannast)**.<br>**Ad.2**. Vegurin til Oyrargjáar er ein klassa 4 vegur, tvs. hann er ikki ein partur av tí yvirskipaða vegakervinum, men skal sum partur av landsvegakervinum kortini haldast viðlíka. Vegurin gongur oman til gomlu ferjuleguna, sum kann verða tikin í nýtslu, um Vágatunnilin verður stongdur.<br>**Ad.3.** Vegurin gjøgnum Sørvág, sum partvís er kommunalur, verður gjøgnumgingin í sambandi við at skilja sundur bleytu og hørða ferðsluna; hetta verður gjørt í samstarvi við kommununa.**(Ferðslukannast)**<br>**Ad.4.** Vegurin fram við Leitisvatni, Vatnavegurin, verður partur av høvuðsvegakervinum, og verður hegn sett upp fram við vegnum at halda seyði burtur. Vegastokkur skal setast upp í støðum. |

| | |
|---|---|
| | **Ad.6**. **(Tekna og útrokna prosjekt og ferðslukanna)** Í Sandavági og Miðvági fer ferðslan gjøgnum bygt øki, og trupulleikar standast av, at bleyta og harða ferðslan blandast.<br>Hesir møguleikar eru:<br>1. Tillaga ferðsluna gjøgnum bygt øki í Sandavági og Miðvági í samstarvi við kommunurnar (ferðslusanering/umhvørvisraðfesting), so gjøgnumkoyrandi ferðslan og tann lokala ferðslan ikki eru til ampa fyri hvønn annan. (Kommunurnar samstarva um arbeiðið at gera ein skúlaveg).<br>2. Ein ringvegur verður gjørdur uttan um bygdirnar til gjøgnumgangandi ferðsluna.<br>3. Ein kombinatión við tunli frá Vágatunlinum til Sandavágs og einum ringvegi við Miðvág.<br>4. Tunnil frá Vágatunlinum til Vatnsoyrar, so øll gjøgnumgangandi ferðsla verður leidd uttan um Sandavág og Miðvág. Henda loysn loysir eisini trupulleikarnar á tí bratta strekkinum millum Fútaklett og Hálsin.<br>**Ad.6 og 7**. Vegamótini í Sandavági, á Vatnsoyrum og í Sørvági, og vegurin fram við skúlanum á Giljanesi skulu eftirmetast og ferðslukannast. **(Ferðslukanna).** |
| **Ferðsla við ferju og tyrlu** | |
| Lýsing av trupulleika | Á kaiini í Sørvági manglar skýli til ferðafólk, sum skulu til Mykines. |
| Uppskot til loysn | Skýli til ferðafólk verður sett upp á kaiini í Sørvági |
| **Ferðslutrygd** | |
| Lýsing av trupulleika | <u>Fólkaskaðar:</u><br>Tað eru staðfest 7 ferðsluóhapp við fólkaskaða síðani ár 2001, 2 óhapp orsakað av kríatúrum, 2 orsakað av hálku og 3 orsakað av rúsdrekka. Óhappini hava helst ikki beinleiðis vegatekniskar orsøkir.<br><u>Materiellir skaðar:</u><br>Tað eru staðfestir materiellir skaðar á øllum vegakervinum í Vágunum. Tað eru hend fleiri ferðsluóhapp á strekkinum við flogvøllin, á Vatnavegnum og í bygdum øki í Miðvági og í Sandavági. |

| | | |
|---|---|---|
| | Uppskot til loysn | 1. Tá ið høvuðsvegakervið verður staðfest, sleppur seyður ikki inn á vegin á strekkinum frá Vágatunlinum til flogvøllin.<br>2. Vegir við nógvari gjøgnumgangandi ferðslu verða lagdir uttan um bygt øki.<br>3. Íbindingar ferðslukannast. |
| **Ferðsluumhvørvi** | | |
| | Lýsing av trupulleika | Tann nógva gjøgnumgangandi ferðslan í Miðvági og Sandavági er ein forðing, sum deilir bygdirnar. |
| | Uppskot til loysn | Gjøgnumgangandi ferðslan verður leidd uttan um bygd økir, sum lýst undir „framkomuleiki“ Ad.8 Fyribils verða ferðslusaneringar gjørdar. |
| **Prosjekt til raðfestingar** | | |
| | Lýsing av prosjektum | – Gjøgnumgangandi ferðsla verður leidd uttan um bygd økir. Vegastrekkið gjøgnum Sandavág og Miðvág er partur av høvuðsvegakervinum; raðfestast má, at høvuðsvegakervið ikki gongur gjøgnum bygd økir, bæði í sambandi við ferðslutrygdina og fyri at tryggja framkomuleika. Uppskot til prosjekt eru lýst omanfyri undir ”framkomuleiki”.<br>– Vegurin frá Fútakletti til Sandavágs. Bøtast kann um hálkutrupulleikar við fráboðan og forsalting. Møguliga gera krúpispor.<br>– Dagføra trupul vegamót í Sandavági og Sørvági.<br>– Dagføra vegin millum flogvøllin og Sørvág.<br>– Sørvágur. Seta upp skýli til ferðafólk.<br>– Sørvágur. Skilja sundur bleyta og harða ferðslu í samstarvi við kommununa.<br>– Viðlíkahald á Oyrargjáarvegnum<br>– Vegurin fram við Leitisvatni, Vatnavegurin. Fráboðan og forsalting. Trupulleikar við seyði kunnu loysast við at staðfesta høvuðsvegakervið. |

# Mykines

| | |
|---|---|
| **Framkomuleiki** | |
| Lýsing av trupulleika | Skiftandi veðrið hevur stóra ávirkan á, at tað er ilt at hava eitt støðugt ferju- ella tyrlusamband út í oynna. |
| Uppskot til loysn | Við at seta eina skjóttgangandi ferju í sigling verður bøtt um flutningin út í oynna, sum bert er virkin í summarhálvuni. |
| **Ferðsla við ferju og tyrlu** | |
| Lýsing av trypulleikum | Ferðsla við ferju og tyrlu er lýst undir ”framkomuleiki”.<br>Fólk við breki verða víst til tyrlutænastuna. |
| Uppskot til loysn | Økt túratal og smidlig tilkalliskipan hevði bøtt um tyrlutænastuna. |
| **Ferðslutrygd** | |
| Lýsing av trupulleika | |
| Uppskot til loysn | |
| **Ferðsluumhvørvi** | |
| Lýsing av trupulleika | |
| Uppskot til loysn | |
| **Framtíðarmøguleikar** | |
| | Møgulig havn í Hellisgjógv. |

<table>
<tr><td colspan="2">Eysturoy,<br>Norðari partur<br>Vegastrekkini til Eiðis,<br>Gjáar, Funnings,<br>Elduvíkar, Oyndafjarðar<br>og Fuglafjarðar.</td></tr>
<tr><td>Framkomuleiki</td><td></td></tr>
<tr><td>Lýsing av trupulleikum</td><td>1. <u>Eiði – Funningur.</u> Vegurin liggur høgt, er smalur og hevur trupulleikar við kava og hálku. Vegurin er óregluligur og manglar vegakslar og vegastokk. Ferðslan er avmarkað.<br>2. <u>Funningur – Gjógv.</u> Vegurin er smalur, óregluligur og hevur ikki vegakslar. Vegurin er sera brattur. Trupulleikar eru við kava, og á sunnara parti á vegnum, við Gjáarskarð, er vandi fyri skalvalopi og omanlopi.<br>3. <u>Funningsfjørður – Funningur</u>. Vegurin er í lagi, óreglulig linjuføring í støðum.<br>4. <u>Elduvíkarvegurin</u> er smalur í støðum. Á einum stað á strekkinum er vandi fyri skalva- og omanlopi.<br>5. <u>Vegamótið Funningsfjørður – Millum Fjarða</u> er trupult. Vegastokkur manglar og kanalisering manglar.<br>6. <u>Millum Fjarða.</u> Strekkið frá Skálabotni til Norðskálatunnilin er ein góður og breiður vegur, men har eru trupulleikar við hálku og seyði. Har henda eisini lutfalsliga nógv ferðsluóhapp, í meðal 11 um árið seinastu 5 árini. Norðasti partur av strekkinum liggur høgt, og har eru trupulleikar við kava.<br>7. <u>Norðskálatunnilin.</u> Tekniskar installatiónir, so sum ljós og trygdarútgerð, mangla.<br>8. <u>Norðskálatunnilin, vestari munni.</u> Beint uttan fyri tunnilin er ein krappur bogi, sum kann koma óvæntað á tey ferðandi.<br>9. <u>Norðskálatunnilin, eystari munni.</u> Uttan fyri tunnilin er ein krappur bogi.<br>10. <u>Vegurin frá Norðskála</u> og niðan til tunnilin hevur eitt bratt strekki, sum elvir til trupulleikar fyri tunga ferðslu. Strekkið liggur høgt og hevur trupulleikar við kava og hálku. Tað henda lutfalsliga nógv</td></tr>
</table>

| | |
|---|---|
| | ferðsluóhapp á strekkinum.<br>11. Útkoyringin frá Shellstøðini við Norðskála er trupul, tí koyrt verður beinleiðis út á høvuðsvegin.<br>12. Oyri - Norðskáli. Ferðslan fer gjøgnum bygt øki; bleyta og harða ferðslan blandast.<br>13. Vegurin til Oyndarfjarðar og Hellurnar. Fleiri trupulleikar eru á vegnum, hann er smalur, brattur og vegastokkur manglar. Á Heltnini eru trupulleikar við kava, og á tí bratta stekkinum oman móti Oyndarfirði og Hellunum eru trupulleikar við hálku.<br>14. Fuglafjørður - Kambsdalur. Vegamótið á Kambsdali er trupult. Atskild gongu- og súkklubreyt manglar á strekkinum frá Fuglafirði til Studentaskúlan á Kambsdali.<br>15. Skálabotnur. Vegamótið í Skálabotni er trupult. |
| Uppskot til loysn | 1. Eiði - Funningur. Vegurin er ein sekunderur vegur, og verður tað tí góðtikið, at framkomuleikin til tíðir er avmarkaður. Talið av víkiplássum eigur at verða økt, tí vegurin verður brúktur sum ein alternativ leið, m.a. tá ið Norðskálatunnilin er stongdur. Vegastokkur skal setast upp.<br>2. Funningur – Gjógv. Vegurin verður dagførdur við vegakslum, har tað ber til. Skalvalop og grót á vegnum skal skrásetast í sambandi við møguliga fyribyrging við kavahegni og/ella fjallatrygging. Vegastokkur skal setast upp. Alternativið er at gera tunnil ein part av strekkinum. **(Tekna prosjekt)**<br>3. Funningsfjørður – Funningur. Ferðin eigur møguliga at skeltast niður í støðum.<br>4. Elduvíkarvegurin verður dagførdur við at gera víkipláss og vegakslar, har tað ber til. Vegastokkur skal setast upp.<br>5. Vegamótið Funningsfjørður - Millum Fjarða. Metast skal um eina tillaging av vegamótinum.<br>6. Millum Fjarða – Norðskálatunnilin. Vegastekkið er ein partur av høvuðsvegakervinum, og tað verður hegnað fram við vegnum. Bøtast kann um trupulleikarnir í sambandi við hálku og kava við forsalting og fráboðan.<br>7. Norðskálatunnilin. Arbeiðið at dagføra tunnilin er í gongd, og arbeiðið umfatar allar tær neyðugu innstallatiónirnar, m.a. ljós og trygdarútgerð. **(Prosjekt er tøkt)**<br>8. Norðskálatunnilin, vestari munni. Bogin eigur at tillagast.<br>9. Norðskálatunnilin, eystari munni. Bogin eigur at tillagast. |

| | |
|---|---|
| | 10. Vegurin frá Norðskála og niðan til tunnilin. Verður tikið upp við atliti at útbyggja vegin við einum sleipispori. **(Tekna og útrokna prosjekt).**<br>11. Shellstøðin við Norðskála. Útkoyringin beinleiðis út á høvuðsvegin skal steingjast; tað ber væl til at hava út-/innkoyring frá Oyrarvegnum.<br>12. Oyri – Norðskáli. Gjørd verður ein gongu- og súkklubreyt við síðuna av landsvegnum.<br>13. Vegurin til Oyndarfjarðar og Hellurnar. Vegurin verður dagførdur, har tað ber til.<br>14. Fuglafjørður - Kambsdalur. **(Tekna og útrokna prosjekt)** Vegamótið á Kambsdali skal tillagast. Atskild gongu- og súkklubreyt eigur at verða gjørd frá Fuglafirði til Studentaskúlan á Kambsdali.<br>15. Skálabotnur **(Tekna og útrokna prosjekt).** Vegamótið í Skálabotni skal tillagast í sambandi við gerð av nýggjum ringvegi uttan um Skálabotn. |
| **Ferðslutrygd** | |
| Lýsing av trupulleika | Fólkaskaðar:<br>Skrásett eru 83 ferðsluóhapp við fólkaskaða á landsvegunum á Eysturoy síðani ár 2000, av hesum doyðu 4.<br><br>Materiellir skaðar:<br>Staðfest eru 648 óhapp íalt síðani 2000. Óhapp eru á øllum landsvegunum, men flestu ferðsluóhappini henda:<br>- Á farleiðini frá Brúnni um Streymin til Skálabotn. Vegirnir við tunnilsmunnarnar, serliga omanfyri Norðskála hava flest óhapp, men annars eru óhapp allan teinin.<br>- Í Skálabotni eru nógv óhapp.<br>- Gjøgnum undir Gøtueiði og Skipanes eru fleiri óhapp.<br>- Farleiðin um Gøtueiði, gjøgnum Gøtugjógv og lutvíst eisini Gøtudal, hevur nógv óhapp.<br>- Nógv óhapp eru somuleiðis við Kambsdal.<br>- Harafturat eru nøkur óhapp í Søldarfirði, Skála, Lambareiði-Glyvrar.<br>Samanumtikið kann sigast, at flestu óhappini henda har mesta ferðslan er. |
| Uppskot til loysn | Kannað verður nærri, júst hvar og hví óhapp henda so at hóskandi tiltøk kunnu gerast. Møgulig tiltøk eru lýst í Framkomuleiki. |

| Ferðsluumhvørvi | |
|---|---|
| Lýsing av trupulleikum | Kambsdalur. Ferðslan í vegamótinum og ferðslan til økið er ein samanblanding av tungari og bleytari ferðslu. |
| Uppskot til loysn | Kambsdalur. Ferðslan verður endurskoðað. Uppskot til loysn verður prosjektið, sum lýst undir ”Framkomuleiki”. |
| **Prosjekt til raðfestingar** | |
| | – Tunnil á einum strekki millum Funning og Gjógv (Gjáartunnil).<br>– Fuglafjørður - Kambsdalur. Vegamótið á Kambsdali verður tillagað (ein møguleiki er rundkoyring). Ein atskild gongu-og súkklubreyt eigur at verða gjørd frá Fuglafirði til Studentaskúlan á Kambsdali..<br>– Norðskálatunnilin. Við vestara munna er ein krappur bogi. Kannað verður, um tillaging er møgulig.<br>– Skálabotnur**.** Tillaga vegamótið í sambandi við gerð av nýggjum ringvegi uttan um Skálabotn.<br>– Vegurin frá Norðskála og niðan til tunnilin. Verður tikið upp við atliti at útbyggja vegin við einum sleipispori. |
| **Framtíðarmøguleikar** | |
| Lýsing | Tunnil frá Hellunum til Fuglafjarðar. |

# Eysturoy, sunnari partur

| Framkomuleiki | |
|---|---|
| Lýsing av trupulleikum | 1. Leirvíkartunnilin. Dagføring manglar, m.a. trygdarútgerð.<br>2. Vegamótið Gøtudalur – vegurin til Leirvíkar. Vegamótið er trupult og elvir til ferðsluóhapp.<br>3. Yvirskipaða ferðslan gjøgnum Leirvík. Ferðslan fellur saman við ta lokalu ferðsluna og hevur við sær, at gjøgnumkoyring er trupul og gongur seint (sí ”ferðsluumhvørvi”).<br>4. Nógv gjøgnumgangandi ferðsla fer gjøgnum bygt øki eftir landsvegnum við Gøtugjógv.<br>5. Vegurin um Gøtueiði er brattur og liggur høgt. Harafturat eru trupulleikar við kava og hálku, og seyður gongur á vegnum. Tað henda lutfalsliga nógv ferðsluóhapp á vegnum, 3 í meðal seinastu 5 árini. Vegurin er trupul hjá tungari ferðslu, serliga um veturin.<br>6. Skálabotnur – Undir Gøtueiði. Á vegnum eru trupulleikar við hálku, og har henda lutfalsliga nógv ferðsluóhapp. Á einstøkum støðum er vandi fyri omanlopi. Norðari partur av vegastrekkinum er í góðum standi, meðan sunnari partur manglar dagføring, m.a. vegastokk og vegakslar.<br>7. Undir Gøtueiði – Skipanes. Ferðslan fer gjøgnum bygt øki og er ein samanblandingur av bleytari og harðari ferðslu, av lokalari ferðslu og sera nógvari gjøgnumgangandi ferðslu.<br>8. Skipanes – Glyvrar. Eitt strekki á vegnum er bratt, ferðsla fer gjøgnum bygt øki í Søldarfirði og á Glyvrum, og á Lambareiði er eitt trupult T-vegamót. Hørð og bleyt ferðsla er samanblandað, og í nøkrum støðum manglar gongubreyt ella atskild gongu- og súkklubreyt. Á strekkinum henda lutfalsliga nógv ferðsluóhapp.<br>9. Vegurin til Lamba hevur ein samanblanding av tungari og bleytari ferðslu, vegurin er óregluligur og smalur, og har mangla vegakslar og gongubreyt/gongugøta.<br>10. Glyvrar – Runavík. Vegurin er ein kommunalur vegur og tekur yvirskipaða ferðslu. Strekkið er handilsvegur, bústaðarvegur og høvuðsvegur. Vegurin er byrjaður við rættiliga nógvari gjøgnumgangandi |

| | |
|---|---|
| | ferðslu og nógvari lokalferðslu. Størsti parturin av vegnum fer gjøgnum bygt øki.<br>11. Runavík – Rituvík – Æðuvík. Vegurin er smalur í støðum og manglar vegakslar. Vegurin er óregluligur, og ferðsla er í bygdum øki (kortini ikki gjøgnumgangandi ferðsla). Vegurin til Æðuvíkar manglar vegakslar.<br>12. Runavík – Toftir – Nes. Ferðslan, sum er ein samanblandingur av bleytari og harðari ferðslu, fer gjøgnum bygt øki. Við Saltnes manglar at byrgja fyri burturmáan.<br>13. Vegurin Um Agnið (Nes – Æðuvík/Rituvík) er ein óregluligur, brattur og smalur vegur; vegurin manglar vegakslar.<br>14. Skálafjørður. Vegurin gongur gjøgnum bygt øki og er ein samanblandingur av bleytari og harðari ferðslu. Harafturat er vegurin smalur, og standardurin lágur.<br>15. Skála – Strendur. Á vegnum er ferðsla, sum fer gjøgnum bygt øki og er ein samanblandingur av bleytari og tungari ferðslu.<br>16. Strendur – Selatrað. Vegurin er smalur og óregluligur og manglar vegakslar. Á einum strekki er vandi fyri omanlopi. Vegurin manglar viðlíkahald, og ferðslan fer gjøgnum bygt øki í øllum trimum bygdunum á strekkinum. |
| Uppskot til loysnir | 1. Leirvikartunnilin verður dagførdur við neyðugari trygdarútgerð. **(Prosjekt er tøkt)**<br>2. Vegamótið Gøtudalur – vegurin til Leirvíkar. Rundkoyring verður gjørd í vegmótinum. **(Prosjekt er tøkt og verður útroknað)**<br>3. Yvirskipaða ferðslan gjøgnum Leirvík verður leidd uttan um bygt øki. Fyribils ferðslan skal tillagast at røkja bæði ta lokalu og gjøgnumgangandi ferðsluna.<br>4. Við Gøtugjógv eru skelti sett upp fyri at minka um ferðina gjøgnum bygdina, tá ið børnini fara í og úr skúla. Ein ringvegur uttan um bygdina hevði loyst trupulleikan við gjøgnumgangandi ferðslu. Ein skitsa er gjørd til ringvegin. Ein annar møguleiki, sum eisini hevði loyst trupulleikan, er ein tunnil millum Gøtudal og Skálafjørðin, hann hevði avlastað økið tí ferðslan hevði minkað nógv á strekkinum. Einn tunnil millum Kambsdal og Skálabotn hevði eisini avlastað økið nakað.**(Tekna og útrokna prosjekt)**<br>5. Vegurin um Gøtueiði kann útbyggjast við krúpispori, men ein tunnil millum Gøtudal/Kambsdal og Skálabotn hevði gjørt vegin óneyðugan í tí yvirskipaða vegakervinum. Tunnilin hevði ført við sær tíðar-, |

| | |
|---|---|
| | orku- og trygdarsparingar **(Tekna og útrokna prosjekt)**<br>6. Skálabotnur – Undir Gøtueiði. Vegurin verður dagførdur.<br>7. Undir Gøtueiði – Skipanes. Vegurin niðanfyri bygdina verður breiðkaður og gjørdur av nýggjum. Ein nýggjur vegur verður gjørdur innanfyri verandi veg til lokalu ferðsluna, og gjøgnumgangandi ferðslan verður framhaldandi eftir uttara vegnum.<br>8. Skipanes – Glyvar. Um vegurin skal vera partur av tí yvirskipaða ferðslukervinum, skal gjøgnumgangandi ferðslan leiðast uttan um bygt øki við einum ringvegi uttan um Søldarfjørð, Glyvrar og Runavík. **(Tekna og útrokna prosjekt)**<br>9. Vegamótið á Lambareiði. Gjørd verður ein rundkoyring ella kanalisering, og vegurin til Lamba verður dagførdur við vegakslum og gongu-/súkklubreyt. **(Tekna og útrokna prosjekt).**<br>10. Glyvrar – Runavík. Vegurin eigur ikki at gerast partur av tí yvirskipaða vegakervinum við teirri grundgeving, at lokala og gjøgnumgangandi ferðslan blandast nógv saman. Við beinleiðis sambandi til Tórshavn við tunli ella brúgv, eigur ein umkoyringarvegur at verða gjørdur fyri at leiða ferðsluna uttan um bygt øki. **(Teknað og útrokna prosjekt).**<br>11. Runavík – Rituvík. Vegurin skal dagførast ella gerast av nýggjum. Prosjekt til nýggjan veg við nýggjari linjuføring er tøk.<br>12. Runavík – Toftir – Nes. Vegurin verður um neyðugt dagførdur.<br>13. Vegurin um Agnið er ikki partur av yvirskipaða vegakervinum, hóskandi ábøtur verða gjørdar.<br>14. Skálafjørður. Umkoyringarvegur er teknaður, hann má verða klárur at taka í nýtslu, í seinasta lagi tá Eysturoyartunnilin verður latin upp fyri ferðslu.<br>15. Skála – Strendur. Vegaprosjektið fram við vestursíðuni á Skálafjørðinum heldur fram og fer at bøta um teir nevndu trupulleikarnar. **(er prosjekterað og farið í gongd)**.<br>16. Strendur – Selatrað. Vegurin verður dagførdur og breiðkaður. |
| **Ferðslutrygd** | |
| Lýsing av trupulleika | |
| Uppskot til loysn | |

| Ferðsluumhvørvi | |
|---|---|
| Lýsing av trupulleikum | 1. Ferðslan gjøgnum Leirvík er trupul, gongur seint og er til ampa. Tað er ein samanblandingur at bleytari og harðari ferðslu, og av lokalari og gjøgnumgangandi ferðslu. Er ein ávís forðing.<br>2. Gøtugjógv. Ferðslan er nógv eftir vegnum, við nógvari gjøgnumgangandi ferðslu gjøgnum bygt øki. Er ein forðing og kennist eisini sum ein fløskuhálsur fyri gjøgnumgangandi ferðsluna.<br>3. Undir Gøtueiði-Skipanes. Á strekkinum eru forðingar við nógvari gjøgnumgangandi ferðslu.<br>4. Fram við eystursíðuni á Skálafjørðinum er ferðslan sera trupul frá Tjørnunesi til Runavíkar; har er ein samanblandingur av yvirskipaðari ferðslu, bústaðum, handlum, kontórum og stovnum. |
| Uppskot til loysnir | 1. Ferðslan gjøgnum Leirvík. Trupulleikin kann loysast við at gera nýggjan ringveg ella við kombinatiónum av lokalum tiltøkum, sum seta ferðina niður hjá gjøgnumgangandi ferðsluni, uttan at vera til óneyuðugan ampa. Sleppast kann undan forðingum við at leiða gjøgnumgangandi ferðsluna uttan um bygt øki.<br>2. Ferðslan fram við eystursíðuni á Skálafjørðinum. Tá fast samband verður frá sunnara parti á Eysturoynni til Suðurstreym, skal yvirskipaða ferðslan flytast yvir á vestaru síðu á Skálafjørðinum, har ein nýggjur yvirskipaður vegur er partvís gjørdur.<br>3. Gøtueiði-Skipanes. Vegurin niðanfyri bygdina verður lutvíst gjørdur av nýggjum, lutvíst breiðkaður. Ein paralellvegur verður innanfyri landsvegin, soleiðis at lokala ferðslan og gjøgnumgangandi ferðslan verða skildar sundur.<br>4. Ein umkoyringarvegur uttanum bygdirnar Søldarfjørð, Glyvrar-Runavík ger at gjøgnumgangandi ferðslan fer uttanum bygt øki. Lokala ferðslan og gjøgnumgangandi ferðslan verða soleiðis skildar sundur. |
| **Prosjekt til raðfestingar** | |
| | o Gøtudalur/Kambsdalur – Skálafjarðartunnilin. Høvuðsvegakervið verður dagført við beinleiðis linjuføring |

| | | |
|---|---|---|
| | | frá Leirvíkartunlinum til Skálafjørðin. Tunnilin fer at hava við sær tíðar- orku- og trygdarsparingar. **(Tekna og útrokna prosjekt).**<br>o Vegamótið Gøtudalur – vegurin til Leirvíkar Rundkoyring verður gjørd í vegamótinum.<br>o Vegurin til Lamba. Rundkoyring ella kanalisering verður gjørd á Lambareiði, og vegurin til Lamba verður dagførdur við vegakslum og gongu-/súkklubreyt. **(Tekna og útrokna prosjekt).**<br>o Skipanes – Glyvrar. Um vegurin skal gerast partur av tí yvirskipaða ferðslukervinum, skal gjøgnumgangandi ferðslan leiðast uttan um bygt øki við ringvegi uttan um Søldafjørð, Glyvrar og Runavík. **(Tekna og útrokna prosjekt).**<br>o Skála – Strendur. Vegaprosjektið fram við eystursíðuni á Skálafjørðinum heldur fram og fer at bøta um teir skitseraður trupulleikarnar. **(Er prosjekterað farið í gongd)**.<br>o Sunnari partur av Eysturoynni verður samanbundin við brúgv ella tunli tvørtur um fjørðin, sum síðani verður kombineraður við undirsjóvartunnil til Suðurstreym. **(Prosjekt er teknað og útroknað).** |
| **Framtíðarmøguleikar** | | |
| | | |

# Norðoyggjar

## Fugloy

| | |
|---|---|
| **Framkomuleiki** | |
| Lýsing a trupulleika | Vegurin millum Hattarvík og Kirkju er í ringum standi. |
| Uppskot til loysn | Vegurin verður neyðugt dagførdur (ábøtur og seta upp autoverju) |
| **Ferðsla við ferju og tyrlu** | |
| Lýsing av trupulleikum | 1. Ferjusambandið er ikki nøktandi.<br>2. Tyrlupallarnir mangla náttarljós.<br>3. Túratal við ferju / tyrlu? |
| Uppskot til loysnir | 1. Ferjusambandið er ikki nøktandi.<br>a. Nýggj ferja, egnað til fólk við breki, og nýggjar ella dagførdar havnir.<br>b. Nýggj ferja, egnað til fólk við breki, og ein nýggj ella dagførd havn á Kirkju ella í Hattarvík, dagførdan veg millum bygdirnar, meira regluligt viðlíkahald, kavarudding o.l.<br>c. Fast samband við undirsjóvartunli millum Fugloy og Svínoy.<br>2. Tyrlupallarnir verða útgjørdir til náttarflúgving. |
| **Ferðslutrygd** | |
| Lýsing av trupulleika | Eingi ferðsluóhapp eru staðfest. |
| Uppskot til loysn | |
| **Ferðsluumhvørvi** | |
| Lýsing av trupulleika | Eingir ferðsluumhvørvistrupulleikar eru staðfestir |
| Uppskot til loysn | |
| **Framtíðarmøguleikar** | |
| | |

# Svínoy

| | |
|---|---|
| **Framkomuleiki** | |
| Lýsing av trupulleika | Vegurin millum bygdina og lendingina á Eiðinum er í ringum standi. |
| Uppskot til loysn | Neyðugar ábøtur verða gjørdar. |
| **Ferðsla við ferju og tyrlu** | |
| Lýsing av trupulleika | 1. Ferjusambandið er ikki nøktandi. |
| Uppskot til loysnir | 1. Nýggj tíðarhóskandi og skjóttgangandi ferja verður fingin til vegar.<br>2. Havnaviðurskiftini verða loyst í samband við at nýggj ferja verður á farleiðini. Her eru fleiri møguleikar:<br>a. Verandi havn á Eiðinum í Svínoy verður dagførd.<br>b. Nýggj havn á Eiðinum í Svínoy<br>c. Nýggj havn í Havn og vegur og tunnil til bygdina. |
| **Ferðslutrygd** | |
| Lýsing av trupulleika | Eingi ferðsluóhapp eru staðfest. |
| Uppskot til loysn | |
| **Ferðsluumhvørvi** | |
| Lýsing av trupulleika | Eingir ferðsluumhvørvistrupulleikar eru staðfestir. |
| Uppskot til loysn | |
| **Framtíðarmøguleikar** | |
| Uppskot til loysn | Fast samband við undirsjóartunli frá Viðoynni ella Borðoynni.<br>Svínoy hevur økir, sum eru vælegnaði til húsabygging. Oyggin kann gerast partur av býarmenningini í Klaksvík, um oyggin fær fast samband. |

# Viðoy

| Framkomuleiki | |
|---|---|
| Lýsing av trupulleikum | 1. Frá Válinum á Viðareiði til Selgjógv er vegurin smalur (einsporaður við møtiplássum); har er ofta omanlop og onkuntíð skalvalop.<br>2. Havnin í Hvannasundi manglar dagføring.<br>3. Byrgingin í Hvannasund skal dagførast og gerast liðug.<br>4. Vegurin millum Hvannasunds og Viðareiðis er trupul í sambandi við kavarudding. |
| Uppskot til loysnir | 1. Vegurin verður dagførdur. Alternativ uppskot at bøta um trupulleikarnar verða gjørd **(Tekna og rokna prosjekt)**. Fyrst verður skrásett, hvar omanlop og skalvalop eru, og síðani mett um, hvørjar íløgur skulu gerast:<br>a. Útbyggja verandi veg og fjallatryggja.<br>b. Gera nýggjan tunnil.<br>c. Fjallatryggja ein part av strekkinum, kombinerað við einum nýggjum tunli.<br>2. Havnin endurskoðast í sambandi við ferðsluloysnir, sum skulu tillagast eini nýggjari ferju.<br>3. Byrgingin í Hvannasundi dagførast og gerast liðug.<br>4. Í kavaruddingin verður nýggj tøkni nýtt (GPS í kavaruddingarakførunum og uppmáting av landvegakervinum). |
| **Ferðsla við ferju og tyrlu** | |
| Lýsing av trupulleika | Í havnini í Hvannasundi er einki skýli til ferðafólk. |
| Uppskot til loysn | Skýli eigur at verða sett upp til ferðafólk. |

| | |
|---|---|
| **Ferðslutrygd** | |
| Lýsing av trupulleikum | <u>Fólkaskaðar:</u><br>Eitt ferðsluóhapp við fólkaskaða er staðfest síðani ár 2000.<br><u>Materiellir skaðar:</u><br>Tað eru staðfestir fleiri materiellir skaðar á vegnum millum Hvannasunds og Viðareiðis. |
| Uppskot til loysn | |
| **Ferðsluumhvørvi** | |
| Lýsing av trupulleika | Ferðsla í bygdum øki á Viðareiði er nevnd sum ein trupulleiki (har er kortini ikki gjøgnumgangandi ferðsla). |
| Uppskot til loysn | Í sambandi við ferðslunøgdina og ferðslutrygdina verða skeltingar og merkingar endurskoðaðar. |
| **Prosjekt til raðfestingar** | |
| Lýsing av prosjektum | o Farleiðin til Viðareiðis – loysnir viðgjørdar omanfyri.<br>o Ferjuhavnin í Hvannasundi verður dagførd, tá avgerð er tikin í sambandi við nýggja ferju. |
| **Framtíðarmøguleikar** | |
| | |

# Borðoy

| Framkomuleiki | |
|---|---|
| Lýsing av trupulleikum | 1. Millum tunlarnar á Borðoynni kann áin leypa í toybili. Hetta er komið fyri 3 ferðir seinastu 20 árini.<br>2. Árnafjarðartunnilin og Hvannasundstunnilin mangla breidd og fría hædd, eins og ljós og trygdarútgerð.<br>3. Av tí, at stutt er millum tunlarnar, kann trupulleiki stinga seg upp, tá ið fleiri bilar standa í bíðirøð fyri at koma inn í tunlarnar.<br>4. Byrgingin í Hvannasundi manglar dagføring (sí Viðoy).<br>5. Byrgingin í Haraldssundi manglar dagføring og liðugtgerð (sí Kunoy).<br>6. Vegurin út á Norðoyrar er ikki liðugtgjørdur.<br>7. Útsýnið í vegamótinum við Ánir er vánaligt. |
| Uppskot til loysnir | 1. Gera ein brunn, sum fangar áarlopi, so tað ikki kemir á vegin.<br>2. Farleiðin um tunlarnar verður dagførd við at: **(Tekna og rokna prosjekt)**:<br>a. Víðka og dagføra verandi tunlar<br>b. Gera nýggjan tunnil Norðuri á Dal til Delpis og dagføra Árnafjarðartunnilin<br>c. Gera nýggjan Árnafjarðartunnil við nýggjari linjuføring og dagføra Hvannasundstunnilin<br>d. Strekkið skal endurskoðast í sambandi við ferðslutrygd<br>3. Byrgingin í Hvannasundi verður dagførd<br>4. Byrgingin í Haraldssundi verður viðgjørd undir ”Kunoy”<br>5. Vegurin út á Norðoyrar gerast liðugur.<br>6. Vegamótið við Ánir ferðslukannast og tryggjast. |

| **Ferðsla við ferju og tyrlu** | |
|---|---|
| Lýsing av trupulleika | Einki skýli er til ferðafólk, sum skulu við ferjuni til Syðradals. |
| Uppskot til loysn | Skýli eigur at verða sett upp til ferðafólk, sum bíða eftir ferjuni til Syðradals. |
| **Ferðslutrygd** | |
| Lýsing av trupulleikum | <u>Fólkaskaðar:</u><br>Tað eru staðfest 6 ferðsluóhapp við fólkaskaða.<br><u>Materiellir skaðar</u>**:**<br>Materiellir skaða henda við tunnilsmunnarnar, í tunlunum, við frákoyringina til Árnafjarðar og í Ánunum. |
| Uppskot til loysnir | <u>Fólkaskaðar:</u><br>Skaðarnir henda partvís orsakað av vegatekniskum viðurskiftum.<br><u>Materiellir skaðar</u><br>Meta um íløgur at fyribyrgja skaðum (vegamótið við Ánir verður ferðslukannað, sum lýst undir ”framkomuleiki”). |
| **Ferðsluumhvørvi** | |
| Lýsing av trupuleikum | 1. Gjøgnumgangandi ferðslan í Klaksvík hevur við sær stórar umhvørvisligar ampar.<br>2. Ferðslustrukturin í norðara parti í Klaksvík er óskipaður og elvir til ótryggleika.<br>3. Árnafjarðartunnilin og Hvannasundstunnilin elva til ótryggleika og eru at meta sum forðingar hjá teimum, sum dagliga koyra gjøgnum tunlarnar. Trupulleikin er størstur á morgni, á middegi og millum kl. 16.00 og 18.00. |

| | |
|---|---|
| Uppskot til loysnir | Ad. 1. **(Tekna og rokna prosjekt)**. Ringveg við Klaksvík, frá Gerðum til Ánirnar.<br><br>Ad. 2. (Kommunalur vegur) Tung ferðsla í sambandi við parkering og gjøgnumgangandi ferðsla geva trupulleikar. Við einum ringvegi, sum lýstur undir ad. 1, skal trupulleikin takast við í uppskotinum um loysn.<br><br>Ad. 3. At útbyggja tunlarnar, sum lýst undir "framkomuleiki", loysir trupulleikan. |
| **Prosjekt til raðfestingar** | |
| Lýsing av prosjektum | o Gera nýggjan tunnil/tunlar at avloysa Árnafjarðartunnilin og Hvannasundstunnilin. **(Tekna og rokna prosjekt).**<br><br>o Ringvegur um Klaksvík, frá Gerðum til Ánirnar. **(Tekna og rokna prosjekt).** |
| **Framtíðarmøguleikar** | |
| | |

# Kunoy

| | |
|---|---|
| **Framkomuleiki** | |
| Lýsing av trupulleikum | 1. Grót á vegnum/omanlop og til tíðir skalvalop á vegnum til Kunoyar bygd.<br>2. Einsporaði tunnilin manglar dagføring, ljós, ventilatión og trygdarútgerð.<br>3. Á einstøkum stekkjum er vandi fyri skalvalopi.<br>4. Byrgingin um Haraldssund skal dagførast og gerast liðug. |
| Uppskot til loysnir | 1. Skráseta hvar ofta grótlop henda, og síðani planleggja tiltøk.<br>2. Ljós, ventilatión og neyðug trygdarútgerð setast upp í tunlinum.<br>3. Strekkið verður tikið við í skipanina við GPS fyri at kanna títtleika og stødd á skalvalopum.<br>4. Byrgingin í Haraldssundi verður dagførd og gjørd liðug. |
| **Ferðsla við ferju og tyrlu** | |
| Lýsing av trupulleika | Eingir trupulleikar staðfestir. |
| Uppskot til loysn | |
| **Ferðslutrygd** | |
| Lýsing av trupulleika | Eingir trupulleikar staðfestir. |
| Uppskot til loysn | |
| **Ferðsluumhvørvi** | |
| Lýsing av trupulleika | Eingir trupulleikar staðfestir. |
| Uppskot til loysn | |

# Kalsoy

| | |
|---|---|
| **Framkomuleiki** | |
| Lýsing av trupulleikum | 1. Á einstøkum strekkjum er vandi fyri skalvalopi og omanlopi.<br>2. Tunlarnir mangla dagføring í sambandi við neyðug trygdartiltøk, portalar o.a.<br>3. Autoverja o.l. manglar, serliga við Trøllanes, í Ritudali, í Villingardali og við sunnara munna á Villingardalstunlinum. |
| Uppskot til loysnir | 1. Skalva- og grótlop verða skrásett, og síðani kunnu tiltøk gerast at byrgja fyri teimum.<br>2. Tunlarnir verða dagførdir, m.a. ljós, trygdarútgerð, loft og portalar.<br>3. Vegurin verður dagførdur við atliti at trygdini |
| **Ferðsla við ferju og tyrlu** | |
| Lýsing av trupulleikum | 1. Ferjan er bygd í 1975, og eigur innan ov langa tíð at verða skift út við aðra ferju.<br>2. Einki skýli er til ferðafólk á kaiini á Syðradali. |
| Uppskot til loysn | 1. Ferjan er nevnd á listanum yvir ferjur, ið eiga at verða skiftar út innan ov langa tíð.<br>2. Skýli verður sett upp á kaiini í Syðradali. |
| **Ferðslutrygd** | |
| Lýsing av trupulleika | Trupulleikar eru við seyði og neytum í tunlunum. |
| Uppskot til loysn | Rulluportur verða sett upp við tunnilsmunnarnar. |
| **Ferðsluumhvørvi** | |
| Lýsing av trupulleika | Eingir trupulleikar eru staðfestir. |
| Uppskot til loysn | |

## 7. Yvirlit yvir størri, raðfestar verkætlanir

| Lýsing av verkætlanum | 1. Raðfesting | 2. Raðfesting |
|---|---|---|
| **Sandvíkartunnilin** verður dagførdur við fartelefonsignali, ljósi og sløkkiútgerð. Seinni verður tunnilin víðkaður ella nýggjur tunnil verður gjørdur. | | X |
| **Hvalbiartunnilin**. Hesir møguleikar verða umhugsaðir:<br>1. Nýggjur tunnil við nýggjari linjuføring verður gjørdur.<br>2. Verandi tunnil verður víðkaður (hædd og breidd) og dagførdur við m.a. neyðugari trygdarútgerð, ella verður gjørdur ein paralellur tunnil við nøkurlunda somu linjuføring. | X | |
| **Øravík – Fámjin**. Um Øraskarð verður vegurin umbygdur til ein 6-800 m tunnil. | | X |
| **Sumbiartunnilin** verður dagførdur við fartelefonsignali, ljósi og sløkkiútgerð | | X |
| **Nýggj ferjuhavn í Hvalba** í sambandi við umskipan av rutuni, aftaná at undirsjóvartunnilin í Sandoynna er komin. | | X |
| **Undirsjóvartunnilin í Sandoynna (Sandoyartunnilin)** (møguliga við sambandi út í Hest)<br>1. Tunnil millum Gomlurætt og Sandoynna<br>2. Tunnil millum Gomlurætt og Sandoynna við sambandi út í Hest | X | |
| **Trupulleikarnir á Dalsvegnum** hava hesi uppskot til loysn:<br>1. Dagføra verandi veg og fjallatryggja ella<br>**2.** gera tunnil millum Húsavík og Dal. | X | |
| **Trupulleikarnir í Sandarlíð** kunnu loysast við at:<br>1. dagføra vegin við nøkurlunda verandi linjuføring<br>2. dagføra vegin við nýggjari linjuføring gjøgnum bergið ovast uppi<br>**3.** dagføra vegin og gera ein tunnil (380 m) á tí mittasta strekkinum | X | |
| **Nýggj ferjuhavn á Sandi**<br>Tá ið fast samband er millum Sandoynna og Streymoynna, verður siglt av Sandi til Suðuroyar. | | X |

| | | |
|---|---|---|
| **Ringvegur uttan um Sands bygd,** við íbinding til Sands havn, verður gjørdur við atliti at ferðsluni til Suðuroyar. Møguliga gera flogvøll í Søltuvík. | | X |
| **Flogvøllur í Søltuvík,** við tilhoyrandi vegi. Metast skal um prosjektið í sambandi við kanningarnar av eini alternativari plasering av flogvøllinum. Kanningarnar koma undir 1. raðfesting, sjálvur flogvøllurin undir 2. raðfesting. | X | |
| **Havnin í Skúvoy** verður útbygd. | X | |
| **Stóra Dímun** tyrlupallurin verður útgjørdur við ljósum, sum gera tað møguligt at flúgva í myrkri. | X | |
| **Sandavágur-Miðvágur.** Trupulleikarnir á strekkinum verða loystir. Hetta kann gerast við at:<br>1) Ferðslukanna strekkið gjøgnum bygt øki<br>2) Gera ein ringveg at leiða gjøgnumgangandi ferðsluna uttan um bygd øki.<br>3) Gera tunnil.<br>Í samsvari við modellið í 4 stigum er ferðslukanningin av strekkinum gjøgnum bygt øki raðfest nr. 1 (á listanum yvir prosjekt, sum skulu ferðslukannast). | | X |
| **Innkomuvegurin til Tórshavn** verður gjørdur í samstarvi við Tórshavnar kommunu. Vegurin verður ikki gjørdur í einum; strekkið frá Skarðshjalla til Krákugjógv er raðfest nr. 1, strekkið móti Havnardali raðfest nr. 2. | X | (X) |
| **Tjørnuvíkarvegurin.** Trupulleikarnir verða loystir við:<br>1. fjallatryggja og dagføra verandi veg ella<br>**2.** gera tunnil til Tjørnuvíkar. | X | |
| **Hósvík – Kollafjørður**. Trupulleikarnir á strekkinum verða loystir við at:<br>1) ferðslukanna vegastrekkið<br>2) gera ringveg uttan um Langasand og ferðslukanna restina av strekkinum<br>3) gera tunnil frá Hósvík til Kollfjarðardal (áraka Oyggjarvegin); er við tíðarsparingum til gagns fyri ferðsluna eystur-/vestureftir, og avlastar havnarøkið í Kollafirði. Eitt alternativ er tunnil millum Hvalvík og Kollfjarðardal (Frammi við Gjónna).<br>(loysn 1 hevur hægstu raðfesting millum prosjektini, sum skulu ferðslukannast) | | X |
| | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Vestmanna – Leynar/Hvalvík.** Kannaðar verða alternativar leiðir við tunli til Vestmanna<br>1. Tunnil Leynar/Kollfjarðadalur - Vestmanna<br>2. Tunnil Kvívík (oman fyri Kvívík) - Vestmanna<br>**3.** Tunnil Kollfjarðardalur (Frammi við Gjónna) - Vestmanna. | | X |
| **Flogvøllur á Glyvursnesi.** Metast skal um prosjektið í sambandi við kanningarnar av alternativari plasering av flogvøllinum. Kanningarnar eru raðfestar nr. 1, sjálvur flogvøllurin raðfestur nr. 2. | X | |
| **Renovera brúnna um Streymin,** sum er afturútsigld, tá talan er um viðlíkahald. | X | |
| **Undirsjóvartunnil millum Eysturoynna og Streymoynna** verður prosjekteraður og útroknaður út frá modellinum í 4 stigum:<br>1) Tunnil av Strondum + brúgv om Skálafjørðin<br>2) Tunnil av Strondum + tunnil under Skálafjørðin<br>3) Tunnil av Toftum + brúgv om Skálafjørðin<br>**4)** Tunnil av Toftum + tunnil under Skálafjørðin | X | |
| **Tunnil frá Gøtudali/Kambsdali til Skálafjørðin** er eitt framhald av prosjektinum av Eysturoyartunlinum; tunnilin loysir harafturat trupulleikan við ferðsluni um Gøtueiði. Arbeitt verður við 3 alternativum:<br>1) Tunnil Gøtudalur – Skálafjørður<br>2) Tunnil Kambsdalur – Skálafjørður<br>3) Ringvegur uttan um Gøtugjógv, Søldarfjørð, Glyvrar og Runavík | | |
| **Skála – Strendur**. Vegaprosjektið fram við vestursíðuni á Skálafjørðinum heldur fram. **(Prosjektið er í gongd)**. | X | |
| **Skálabotnur, ringvegur**. Vegaprosjektið fram við vestursíðuni á Skálafjørðinum heldur fram við ringvegi uttan um bygdina Skálafjørð. **(Prosjektið er partvís prosjekterað)**. | X | |
| **Umlegging av vegnum Undir Gøtueiði** | X | |
| **Árnafjarðartunnilin og Hvannasundstunnilin.** Alternativ uppskot verða gjørd:<br>1. Tunnil frá Klaksvík (Norðoyrarvegnum) til Árnafjarðar og víðari til Norðtoftir.<br>2. Tunnil frá Strond til Norðdepils + dagføring av verandi Árnafjarðartunli. | X | |

| | | |
|---|---|---|
| 3. Víðka verandi tunlar ella gera nýggjar tunlar við umleið somu linjuføring. | | |
| **Ringvegur uttan um Klaksvík** at avlasta gjøgnumgangandi ferðsluna. Vegurin er eitt framhald av prosjektinum av Depilstunlinum, alternativ 2 og 3. | | X |
| **Vegurin frá Viðareiði** er smalur (partvís einsporaður við møtiplássum), vandi er fyri skalvalopi og omanlopi. Tríggjar loysnir eru:<br>1. Fjallatrygging og í støðum víðka vegaprofilin<br>2. Fjallatrygging kombinerað við tunli ein part av strekkinum<br>**3.** Tunnil til Miðdal, og nýggjan veg | | X |
| **Ferjuhavnirnar í Hvannasundi, á Kirkju og í Hattarvík** verða dagførdar, tá ið avgerð um nýggja ferju er tikin. | X | |
| **Nýggj/dagførd havn á Eiðinum í Svínoy** | X | |
| **Kalsoy, liðugtgerð av tunlunum og vegakervinum** | X | |
| **Byrgingin í Haraldssundi dagførast og gerast liðug.** Hetta arbeiðið kann gerast samstundis sum Depilstunnilin. | X | |

**8. Yvirlit yvir smærri verkætlanir (til ferðslugransking)**

## Suðuroy

1) **Tvøroyri**. Vegakervið gjøgnum býin verður dagført, og í sambandi við umvælingar, verða vegakslar og gongu- og súkklubreyt tikin við í metingina.
2) **Tvøroyri – Krambatangi.** Strekkið verður útbygt við breytum til bleytu ferðsluna frá ferjuni.
3) **Porkeri – Vágur**. Vegastokkur verður settur upp á ávísum støðum. Útkoyringin frá bústaðarøkinum fram við vegnum verður kannað í sambandi við ferðslutryggar loysnir.
4) **Vágur**. Vegakervið gjøgnum býin verður dagført, og í sambandi við umvælingar verða vegakslar og gongu- og súkklubreyt tikin við í metingina.
5) **Øravíkarlíð.** Har henda lutfalsliga nógv ferðsluóhapp; orsøkirnar eru ymiskar, m.a. hálka.
6) **Trongisvágur.** Frá Trongisvági og niðan til Hvalbiartunnilin henda lutfalsliga nógv ferðsluóhapp; fleiri av teimum henda orsakað av seyði, og fleiri orsakað av hálku. Vegurin verður dagførdur og møguliga breiðkaður, ella verða fleiri møtipláss gjørd.

## Sandoy

7) Tað eru staðfest fleiri ferðsluóhapp við materiellum skaða á vegakervinum í Sandoynni. Serliga nógv óhapp henda á strekkinum millum **Meginskúlan og Skopun.** Hetta strekkið skal kannast, serliga ferðslan við skúlan.

## Vágarnar

8) **Vegamótið við Fútaklett** er trupult.
9) **Vegurin gjøgnum Sørvág** skal kannast saman við kommununi við atliti at skilja sundur bleyta og harða ferðslu, har tað ber til.
10) **Vegurin millum Bø og Gásadal** skal dagførast.
11) **Sandavágur** og **Miðvágur**. Vegirnir skulu tillagast (ferðslusanering/umhvørvisraðfesting), soleiðis at tann gjøgnumgangandi ferðslan og tann lokala ferðslan, bæði tann bleyta og harða, eru til minst møguligan ampa fyri hvønn annan. Seinni verður gjøgnumgangandi ferðslan leidd uttan um bygda øki.
12) **Sandavágur og Vatnsoyrar.** Trupul vegamót verða endurskoðað.
13) **Vegurin millum Fútaklett og Sandavág.** Møguliga gera sleipispor á Sandavágshálsi.

## Streymoy

14) **Brúgvin um Streymin – Streymnes – Hvalvík – Áir – Hósvík**. Vegurin verður endurskoðaður í sambandi við vegamót og ferðsluóhapp.
15) **Hósvík – Kollafjørður**. Vegurin verður kannaður í sambandi við íbindingar og ferðsluóhapp. Samanblandingurin av bleytari og harðari ferðslu Inni í Firði í Kollafirði kann loysast, sum lýst niðanfyri:

- Gera eina **gøtuskipan** til bleytu ferðsluna, sum verður atskild frá tungu ferðsluni (ferðsla verður framvegis í bygdum øki).
- Gera ein **umkoyringarveg Inni í Firði** í Kollafirði.
- Gera **tunnil** frá **Hósvík til Kollfjarðadal**, sum leiðir tungu ferðsluna uttan um bygt øki í Kollafirði, og tískil verður til fyrimuns fyri ferðsluna eystur-/vestureftir, eins og ferðsluni til bingju- og uppskipingarstøðini báðumegin Kollafjørð.

16) **Økið við Signabø** Frá at vera ein lítil bygd, er Signabøur nú ein bingjuhavn í Tórshavnar kommunu, og vegurin má dagførast tilsvarandi. Í sambandi við útbygging av ferðslukervinum, so skal bleyta ferðslan takast við í ætlanirnar..
17) **Vestmanna – Leynar**. Vegurin verður dagførdur, og Vestmanna og Leynar skulu ferðslusanerast við atliti at skilja sundur bleyta og harða ferðslu á landsvegakervinum. Verandi vegur til Vestmanna verður raðfestur hægri í sambandi við kavaruding. Alternativar leiðir við tunli til Vestmanna verða kannaðar.
18) **Vegamóti í Kalbaksbotni** verður endurskoðað; ein frákoyringarbreyt kann gerast til ferðsluna til Kaldbaks.
19) **Kollafjarðartunnilin - rundkoyringin í Hoyvík**. Vegurin verður kannaður í sambandi við dagføring av vegageometriini. Vegíbindingar skulu endurskoðast, og ein rundkoyring verður gjørd við íbindingina í Ringvegin.
20) **Vegamótið á Hvítanesi** verður endurskoðað, og møguleikarnir at plasera eina frákoyringarbreyt verða kannaðir. Innkomuvegurin verður gjøgnumgingin í sambandi við ferðslusanering.
21) **Vegamótið á Sandvíkarhjalla** skal kannast í sambandi við gerð av frákoyringarbreyt á høvuðsvegnum.
22) **Vegíbindingin við Mannbrekku**. Loysnin at gera rundkoyring er nevnd; alternativið er at steingja innkoyring frá høvuðsvegnum.
23) **Vegíbindingin á Norðasta Horni** skal ferðslukannast.
24) **Ferðslan uttan um Tórshavn**. Vegakervið rundan um innkomuvegirnar verður útbygt so hvørt.

## Eysturoy

25) **<u>Vegamótið Funningsfjørður – Millum Fjarða.</u>** Metast skal um tillagingar.
26) **<u>Fuglafjørður - Kambsdalur</u>**. Innkoyringin til Kambsdal skal tillagast í samstarvi við kommununa. Ein atskild gongu-og súkklubreyt eigur at verða gjørd millum Fuglafjørð og Studentaskúlan á Kambsdali.
27) **<u>Vegamótið Gøtudalur – vegurin til Leirvík</u>**. Rundkoyring ella annað samsvarandi verður gjørt í vegamótinum.
28) **<u>Norðskálatunnilin.</u>** Við vestara munna er eitt krappur bogi. Kannað verður, um tillaging er møgulig.
29) **<u>Vegurin Norðskáli - Norðskálatunnilin</u>** skal kannast í sambandi við at byggja vegin út við einum **sleipispori.**
30) **<u>Vegamótið á Lambareiði</u>**. Ein ferðsluloysn skal finnast við vegin til Lamba. Síðuvegurin skal dagførast við vegakslum og gøtum.
31) **<u>Vegurin til Lamba</u>** skal dagførast við vegakslum og gongu-/súkklubreyt.
32) **<u>Selatrað – Strendur</u>.** Ábøtur og sanering.
33) **<u>Valaknúkar – Skipanes</u>**. Strekkið skal tillagast við vegakslum.
34) **<u>Rituvíkarvegurin</u>** skal dagførast.

## Norðoyggjar

35) **<u>Byrgingin í Hvannasundi</u>** skal dagførast og gerast liðug.
36) **<u>Landsvegurin gjøgnum Viðareiði.</u>** Ferðslutrygdin kannast.
37) **<u>Vegastrekkið millum Árnafjarðartunnilin og Hvannasundstunnilin.</u>** Har henda fleiri ferðsluóhapp, kannað verður hví, og hóskandi ábøtur verða gjørdar. .
38) **<u>Byrgingin um Haraldssund</u>** skal ferðslukannast og dagførast.
39) **<u>Vegamótið við Ánir</u>** skal ferðslukannast og tryggjast.
40) **<u>Ferðslusanera norðaru innkoyringina til Klaksvíkar</u>**. Eitt prosjekt verður gjørt í samstarvi við kommununa.
41) **<u>Trupulleikar við kríatúrum í tunlunum á Kalsoynni</u>.** Leggja rulluportur í vegin við tunnilsmunnarnar.

**9. Kort, ið lýsa støðumetingina av landsvegakervinum**



Vegateinur við møguleika fyri grótlopi
Vegateinur við møguleika fyri skalvalopi
Smalur vegur
Óreglulig vegaføring
Brattur vegur
Høgtliggjandi vegur
Vegateinur við kavatrupulleikum
Vegateinur við hálkutrupulleikum
Vandi fyri burturmáan
Ferðsla í bygdum øki
Umvegur
Einbreytaður tunnil
Ikki dagførdur tunnil (ljós- og trygdarútgerð)
Ov lágur tunnil
Trupult vegamót
Nógv ferðsluóhapp
Ongin vegøksl
Blandað ferðsla (bleyt og hørð)
Seyður/kríatúr á vegnum
Vantandi viðlíkahald
Annað
Ótíðarhóskandi ferja
Long siglingarleið
Manglandi títtleiki


Vegateinur við møguleika fyri grótlopi
Vegateinur við møguleika fyri skalvalopi
Smalur vegur
Óreglulig vegaføring
Brattur vegur
Høgtliggjandi vegur
Vegateinur við kavatrupulleikum
Vegateinur við hálkutrupulleikum
Vandi fyri burturmáan
Ferðsla í bygdum øki
Umvegur
Einbreytaður tunnil
Ikki dagførdur tunnil (ljós- og trygdarútgerð)
Ov lágur tunnil
Trupult vegamót
Nógv ferðsluóhapp
Ongin vegøksl
Blandað ferðsla (bleyt og hørð)
Seyður/kríatúr á vegnum
Vantandi viðlíkahald
Annað
Ótíðarhóskandi ferja
Long siglingarleið
Manglandi títtleiki


Vegateinur við møguleika fyri grótlopi
Vegateinur við møguleika fyri skalvalopi
Smalur vegur
Óreglulig vegaføring
Brattur vegur
Høgtliggjandi vegur
Vegateinur við kavatrupulleikum
Vegateinur við hálkutrupulleikum
Vandi fyri burturmáan
Ferðsla í bygdum øki
Umvegur
Einbreytaður tunnil
Ikki dagførdur tunnil (ljós- og trygdarútgerð)
Ov lágur tunnil
Trupult vegamót
Nógv ferðsluóhapp
Ongin vegøksl
Blandað ferðsla (bleyt og hørð)
Seyður/kríatúr á vegnum
Vantandi viðlíkahald
Annað
Ótíðarhóskandi ferja
Long siglingarleið
Manglandi títtleiki



- Vegateinur við møguleika fyri grótlopi
- Vegateinur við møguleika fyri skalvalopi
- Smalur vegur
- Óreglulig vegaføring
- Brattur vegur
- Høgtliggjandi vegur
- Vegateinur við kavatrupulleikum
- Vegateinur við hálkutrupulleikum
- Vandi fyri burturmáan
- Ferðsla í bygdum øki
- Umvegur
- Einbreytaður tunnil
- Ikki dagførdur tunnil (ljós- og trygdarútgerð)
- Ov lágur tunnil
- Trupult vegamót
- Nógv ferðsluóhapp
- Ongin vegøksl
- Blandað ferðsla (bleyt og hørð)
- Seyður/kríatúr á vegnum
- Vantandi viðlíkahald
- Annað
- Ótíðarhóskandi ferja
- Long siglingarleið
- Manglandi títtleiki


Vegateinur við møguleika fyri grótlopi
Vegateinur við møguleika fyri skalvalopi
Smalur vegur
Óreglulig vegaføring
Brattur vegur
Høgtliggjandi vegur
Vegateinur við kavatrupulleikum
Vegateinur við hálkutrupulleikum
Vandi fyri burturmáan
Ferðsla í bygdum øki
Umvegur
Einbreytaður tunnil
Ikki dagførdur tunnil (ljós- og trygdarútgerð)
Ov lágur tunnil
Trupult vegamót
Nógv ferðsluóhapp
Ongin vegøksl
Blandað ferðsla (bleyt og hørð)
Seyður/kríatúr á vegnum
Vantandi viðlíkahald
Annað
Ótíðarhóskandi ferja
Long siglingarleið
Manglandi títtleiki



Vegateinur við møguleika fyri grótlopi
Vegateinur við møguleika fyri skalvalopi
Smalur vegur
Óreglulig vegaføring
Brattur vegur
Høgtliggjandi vegur
Vegateinur við kavatrupulleikum
Vegateinur við hálkutrupulleikum
Vandi fyri burturmáan
Ferðsla í bygdum øki
Umvegur
Einbreytaður tunnil
Ikki dagførdur tunnil (ljós- og trygdarútgerð)
Ov lágur tunnil
⊗ Trupult vegamót
Nógv ferðsluóhapp
Ongin vegøksl
Blandað ferðsla (bleyt og hørð)
Seyður/kríatúr á vegnum
Vantandi viðlíkahald
Annað
Ótíðarhóskandi ferja
Long siglingarleið
Manglandi títtleiki